# Føroya Arbeiðsgevarafelag
# Ársfrágreiðing 2013

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Vinnuhúsið
Smærugøta 9A
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn

# Frágreiðing frá nevndini

Nú er vend komin í, og eftir fleiri ár við stagnatión sær út til, at eftirspurningurin eftir vørum og serliga tænastum er við at taka seg uppaftur. Arbeiðsloysið er fallið nógv, í mun til tá tað var hægst, og er nú 4,3 % í mun til 4,7 % somu tíð í fjør. Hetta er gott, men tað vísir seg tó at vera torført serliga at fáa fatur á røttu arbeiðsmegini til handverksvinnuna, men eisini á tekniskum starvsfólki til aðrar partar av vinnuni.

Um hugt verður eftir lønarútgjaldingum í 2013 í mun til 2008 sæst, at lønarútgjaldingarnar frá vinnuni framvegis eru knappar 200 mió. kr. lægri, enn tær vóru í 2008, meðan lønarútgjaldingarnar hjá tí almenna eru hækkaðar við 450 mió kr.

Verður hugt nærri eftir tølunum sæst, at tað serliga er byggivinnan, sum hevur havt stórt fall í lønarútgjaldingum, men eisini handilsvinnan, ídnaður og fíggjarvinna hava havt stórt fall í lønarútgjaldingum, um 2008 og 2013 verða samanborin.

Fiskiveiða, alivinna og shippingvinnan hava tó havt vøkstur í lønarútgjaldingum. Innan tað almenna er vøkstur í lønargjaldingunum á øllum økjum, men serliga eru tað kommunur og ríkisstovnar, sum hava havt stóran vøkstur í lønargjaldingum.

Fiskivinnan hevur enn stórar avbjóðingar, serliga undir Føroyum. Fiskiskapurin er framvegis sera vánaligur. Veiðan eftir toski og hýsu umframt upsa, sum hevur verið álitið seinastu nógvu árini, er framvegis vánalig.

Orsakað av, at marknaðirnir hava tikið seg væl uppaftur í mun til 2008, og orsakað av økta fiskiskapinum eftir uppisjóvarfiski, sæst vánaligi fiskiskapurin ikki aftur í lønarútgjaldingunum. Hetta sjálvt um pelagiska vinnan hevur liðið undir tiltøkunum, sum ES setti í verk ímóti Føroyum í august 2014.

Alivinnan hevur havt góðar umstøður á marknaðinum seinastu árini. Útlitini fyri 2013 vóru góð, og um hugt verður eftir útflutningsvirðinum, sum nú er 40% av samlaða føroyska útflutninginum, gjørdist hetta besta árið nakrantíð hjá alivinnuni. Hóast amøban, sum elvir til toknisjúkuna kallað AGD, varð staðfest í føroyskum laksi í 2013, og sjúkuelvandi ILA virus varð funnið í Sundalagnum, er sjúka ikki staðfest, og einki fellið hevur verið orsaka av hesum.

Lívfrøðiliga gongur sostatt framvegis væl í alivinnuni, men tað er framhaldandi ein avbjóðing at halda laksalúsini niðri. Hetta tekur alivinnan í størsta álvara og arbeiðir áhaldandi við hesum.

Byggivinnan hevur havt trupul ár síðan 2008, og minkandi lønarútgjaldingarnar tala fyri seg. Tað almenna hevur seinastu árini sett munandi upphæddir av fyri at økja virksemið, men tað vísir seg at ganga sera drúgv tíð, áðrenn hesar ætlanir gerast veruleiki. Hetta er ein stór avbjóðing, sum vinnan fleiri ferðir hevur víst á. Tó so, higartil í 2014 eru lønarútgjaldingarnar í byggivinnuni vaksnar munandi samanborið við sama tíðarskeið í fjør, og ber tað boð um, at gongd nú er komin á byggivinnuna aftur.

Í ársfrágreiðingini hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri 2010, hevði felagið sjónarmið um ferðavinnuna, og hvussu karmarnir um ferðavinnuna eiga at verða skipaðir. Arbeiðsgevarafelagið kann í dag fegnast um, at flestu av tilmælunum, sum tá vórðu givin, eru fylgd. Visit Faroe Island hevur latið frá sær ársfrágreiðingina fyri 2013, og greiðar ábendingar eru um, at økta játtanin til marknaðarføring ber ávøkstur.

Sjálvandi eru vit ikki enn komin á mál, og tað eru avbjóðingar í ferðavinnuni, sum eiga at verða loystar. Ein spurningur, sum ferðavinnan hevur víst á er, at tað eigur at gerast møguligt, at heilsølur eisini kunnu innflyta drykkivørur. Hetta fyri at kunna veita kundunum betri góðsku og prís. Harafturat vísir tað seg bæði í gistingum og ferðafólkaflutningi, at ójavni eftirspurningurin millum summar og vetur er ein avbjóðing fyri ferðavinnuna. Miðað eigur at verður ímóti at fáa fleiri ferðafólk til Føroya uttan fyri háárstíð, soleiðis minka verður um sveiggini við at vaksa um ferðafolkatalið í mið- og lágárstíð Sum støðan er í dag, er kapasiteturin at flyta ferðafólk hendavegin ov lítil um høgtíðirnar og um summarið. Hetta er ikki ein haldbar støða, hvørki fyri ferðavinnuna ella fyri føroyingar sum heild. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at hetta eru tvey mál, sum arbeitt eigur at vera við framyvir.

2013 hevur víst seg at verða heldur frægari fyri aðrar tænastuvinnur enn undanfarnu árini. Vinnugreinarnar hava flest allar verið ígjøgnum drúgva tillaging orsakað av minkandi virksemi.

## Tilfeingisgjald á fiskivinnu og loyvisgjøld á alivinnu, betri marknaðaratgongd og gagnnýting av møguleikunum í byggivinnuni

Ein týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at hava vakið eyga við tí, sum hendir á vinnupolitiska økinum og í samfelagnum annars.

Í Føroyum búgva sløk 50.000 fólk, sum vilja hava eitt livistøði, sum er kappingarført í mun til londini kring okkum. Vit hava tó nakrar stórar avbjóðingar, sum loysn má fáast á.

Nýskipan er neyðug á fleiri økjum. Henda nýskipan skal hava til endamáls at fáa tamarhald á útreiðslunum og at fáa inntøkurnar til samfelagið upp. Í vinnuni er tað serliga innan fiskivinnuna, at neyðugt er at fáa framleidni upp, sí ársfrágreiðing frá 2011 og 2012.

Í ársfrágreiðing Føroya Arbeiðsgevarafelags í 2013 verða tilfeingis og loyvisgjøld á fiski- og alivinnu tikin upp. Onnur viðurskifti, sum eisini eru av alstórum týdningi, er at fáa gongd á at fáa fleiri handils- og heilsufrøðiligar avtalur fyri at tryggja útflutningsvinnuni betri atgongd til marknaðir í stórum vøkstri. Somuleiðis heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at byggivinnan hevur brúk fyri kørmum, sum styðja undir stóru menningarmøguleikarnarar, sum eru í vinnuni fyri vøkstri bæði innlendis og uttanlands.

- Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at politiska skipanin finnur ein fastan leist, sum eitt møguligt tilfeingisgjald frá fiskivinnuni verður kravt inn eftir, og at vinnulívið verður tikið við uppá ráð. Eisini verður mælt til, at peningurin frá slíkum gjaldi verður settur í Búskapargrunn. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at skipan við tilfeingisgjaldi skal ikki taka virkishugin frá teimum vinnurekandi, og tískil er neyðugt, at skipanin verður grundað á ein staðfestan og áhaldandi vinning. Stóran týdning hevur tað eisini, at eitt slíkt gjald ikki hevur neiligа ávirkan á kappingarførið hjá vinnuni í mun til umheimin.

  Somuleiðis mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at politiska skipanin skapar frið kring loyvisgjaldsskipanina fyri alivinnuna, soleiðis sum arbeiðsbólkurin umboðandi politisku skipanina og alivinnuna var samdur um.

- Tað er altavgerðandi fyri menningina av føroysku útflutningsvinnuni, at fokus verður sett á, at vinnan hevur best møguligu marknaðaratgongdina fyri føroyskar fiskavørur. Her verður bæði hugsað um handilsavtalur og heilsufrøðiligar avtalur, har tað er neyðugt.

  Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í samband við hesa ársfrágreiðing gjørt eina kanning millum útflytarar. Kanningin vísir, at tað er umráðandi at fáa fríhandilsavtalur í lag við m.a. Kina og Turkaland, og at heilsufrøðiligar avtalur verða gjørdar við m.a. Brasil og Australia. Um hetta skal lata seg gera, er alneyðugt, at fíggjarorka verður sett av til økið, og at politiska skipanin raðfestur samráðingar við hesi lond.

  Umfráðandi er eisini, at samráðingar um fríhandilsavtalu við tollsamgonguna millum Russland, Hvítarussland og Kazakstan kemur á mál.

- Føroyska byggivinnan hevur ment seg sera nógv seinastu nógvu árini. Alt fleiri føroyskar fyritøkur eru, sum eru førar fyri at bjóða uppá stórar avbjóðandi byggiuppgávur í kapping við stórar útlendskar fyritøkur.

  Tað er stórir menningarmøguleikar í vinnuni, men tað vísir seg, at tey, sum bjóða út stór arbeiðir, ikki geva sær far um hetta. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at Løgtingið og byggiharrar gera sær ómak við at bjóða út á ein hátt, so føroysk byggi- og ráðgevaravinna kann menna sínar førleikar uppaftur meira. Eisini verður mælt til, at borið verður soleiðis í bandi, at hildið verður fast við at menna verandi lóggávu og avtalugrundarlag í byggivinnuni út frá einum leisti, sum er lagaður til viðurskiftini í Føroyum. Annað mál av stórum týdningi er, at skattligu viðurskiftini hjá føroyingum, sum arbeiða í Føroyum verða javnsett við skattligu viðurskiftini hjá føroyingum, sum arbeiða uttanlands.

## Sáttmálasamráðingar

Sáttmálasamráðingar við fakfeløgini er týdningarmiklasta uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag. Nýggj samráðingarrunda

byrjaði í mai við samráðingunum við tey fimm arbeiðarafeløgini um sáttmálarnar, sum gingu út hin 1. mai 2014. Semjan við arbeiðarafeløgini endaði við einari hækking í lønum og øðrum ágóðum, sum svarar til 1,98 % fyrsta árið og 2,25 % seinna árið. Hesar samráðingar leggja karmin fyri allar samráðingarnar hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag í hesi samráðingarrunduni, sum verður liðug á heysti 2015.

Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um, at tað hevur eydnast at gera avtalu við sáttmálapartarnar um fráboðanarfreist í sambandi við møguligt verkfall.

Hesir sáttmálar vóru teir fyrstu av teimum tilsaman 40 sáttmálunum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur við løntakarafeløgini. Inntil á heysti 2015, tá sáttmálin við Føroysk Miðlafólk gongur út, verða samráðingar við hesi feløg so hvørt, sáttmálarnir ganga út. Fyrstu av hesum samráðingum vóru við Maskinmeistara-

felagið fyri maskinmeistarar á landi, og var semja undirskrivað 23. mai við somu lønarhækkingum sum sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini. Eisini her varð avtala gjørd um fráboðanarfreist.

**28. mai 2014**

**Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag**

**Bergur Poulsen, formaður**

# INNIHALDSYVIRLIT

**FRÁGREIÐING FRÁ NEVNDINI** .......... 2

**INNGANGUR** .......... 5

**HVAT ER NÚ AT GERA? TILMÆLI FRÁ FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** .......... 6

TILFEINGISGJØLD Á FISKIVINNUNA OG LOYVISGJØLD Á ALIVINNUNAA .......... 6
*Gongdin higartil* .......... *6*
*Føroya Arbeiðsgevarafelag ávarar* .......... *6*
*Alivinnan* .......... *6*
*Fiskivinnan* .......... *7*
*Tilmæli frá FAG* .......... *7*
VIT MUGU SETA FOKUS Á MARKNAÐARATGONGD .......... 8
*Gongdin seinastu árini* .......... *8*
*Hvat sigur útflutningsvinnan?* .......... *8*
*Er vorðið til ein spurning um, hvør skal gjalda* .......... *9*
*Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag* .......... *10*
FØROYSK BYGGIVINNA – EIN VINNA VIÐ STÓRUM MØGULEIKUM .......... 10
*Veljið føroykst* .......... *10*
*Atgongd til arbeiðsmegi* .......... *11*
*Greiðar reglur og avtalugrundarlag* .......... *11*
*Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag* .......... *12*

**MÁL Í 2013 OG 2014** .......... 13

**SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR 2013 – 2014** .......... 14

*Samráðingarrundan 2012 – 2014* .......... *14*
*Samráðingar við manningarfeløgini* .......... *14*
*Samráðingar við Føroysk Miðlafólk* .......... *14*
*Samráðingarrundan 2014 – 2016* .......... *14*
*Samráðingar við arbeiðarafeløgini* .......... *14*
*Samráðingar við Maskinmeistara-felagið um sáttmálan á landi* .......... *14*
*Komandi Sáttmálasamráðingar* .......... *15*

**TILTØK 2013-2014** .......... 16

*Vinnunám* .......... *16*
*Vinnudagurin 2013* .......... *16*

**GONGDIN INNAN YMISKU VINNUGREINARNAR** .......... 18

FISKI- OG FLAKAVINNAN .......... 18
*Útflutningurin* .......... *18*
*Rávørutilgongdin* .......... *18*
*Flakavinnan* .......... *19*
*Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu* .......... *19*
*Marknaðurin* .......... *20*
ALIVINNAN .......... 20
*Útflutningsvirðið* .......... *21*
HANDVERKSVINNAN .......... 22
*Gongdin í handverksvinnuni* .......... *22*
*Útlit fyri handverksvinnuna* .......... *23*
SHIPPINGVINNAN .......... 24
OLJUVINNAN .......... 24
KT-VINNAN .......... 25
SAMSKIFTISVINNAN .......... 26
RÁÐGEVARAVINNAN .......... 26
HANDILSVINNAN .......... 26
FERÐAVINNAN .......... 27
*Hvat er eftir at gera?* .......... *29*
PENINGASTOVNARNIR .......... 29
*Raksturin* .......... *30*
*Lønarhæddaravgjald* .......... *30*
*SIFI-skipanin* .......... *31*
*Virkisveð* .......... *31*

**UM FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG, VINNUHÚSIÐ OG FELØGINI ANNARS** .......... 32

**HVØR HÚSAST Í VINNUHÚSINUM?** .......... 33

**NEVNDIN Í FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG** .......... 34

# Inngangur

Føroya Arbeiðsgevarafelag umboðar flestu arbeiðsgevarar í landinum, og er virksemið hjá okkara limum sum heild grundarlagið undir samfelagnum.

Sum ein týdningarmikil spælari í føroyska samfelagnum átekur Føroya Arbeiðsgevarafelag sær leiklutin sum viðmerkjari og viðspælari í mun til, hvussu samfelagið Føroyar eigur at vera skipað.

Sjónarmið Føroya Arbeiðsgevarafelags verða á hvørjum ári staðfest í ársfrágreiðingini og annars so hvørt á heimasíðu felagsins www.industry.fo.

Í ársfrágreiðingunum undanfarin ár og í frágreiðingum frá felagnum annars eru eisini sjónarmið felagsins um allar tættir, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur hava týdning fyri føroysku vinnuna og samfelagið.

Hetta ger Føroya Arbeiðsgevarafelag ásannandi, at góðir karmar fyri vinnu og eitt burðardygt vinnulív eru nær tengd at gongdini í samfelagnum.

Seinastu árini hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag í ársfrágreiðing síni sett fokus á m.a. tørvin á nýskipan av skattaskipanini, atgongd til arbeiðsmegi, fólkaflyting og fólkavøkstur, burðardygga fiskiveiðu og lønsemi í fiskivinnuni.

Í hesi ársfrágreiðing fyri 2013 nýtir Føroya Arbeiðsgevarafelag høvi at koma við sínum sjónarmiðum um, hvørjum viðurskiftum neyðugt eisini er at geva gætur komandi tíðina. Hetta verður gjørt fyri at skapa kjak um loysnir fyri føroyska samfelagið, soleiðis at vit fáa eitt gott og sterkt grundarlag undir tí búskaparvøkstri, sum væntandi er á gáttini.

Tað eru óivað onnur viðurskifti, sum høvdu verið týdningarmikil at tikið upp, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í ár valt at seta sjóneykuna á trý evni undir hesum yvirskriftum:

- Tilfeingis gjald á fiskivinnuna og loyvisgjøld á alivinnuna
- Vit mugu seta fokus á marknaðaratgongd
- Føroysk byggvinna – ein vinna við stórum møguleikum

# Hvat er nú at gera? Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

## *Tilfeingisgjøld á fiskivinnuna og loyvisgjøld á alivinnunaa*

### Gongdin higartil

Seinastu árini hevur løgtingið álagt fiski- og alivinnuni alsamt fleiri og hægri tilfeingisgjøld á fiskivinnuna og loyvisgjøld á alivinnuna. Í 2010 samtykti løgtingið ein eykaskatt uppá 2,5 prosent av yvirskoti omanfyri eina millión krónur, og harafturat er seinastu árini álagt eitt kilogjald á fiskasløgini sild og makrel. Kilogjaldið á sild og makrel hevur verið broytt fleiri ferðir hesi árini, og leisturin hevur ongantíð verið hin sami.

Í fjør samtykti løgtingið síðani at hækka eyka skattin upp í 7 prosent fyri fiski- og alivinnuna. Hetta hendi í sambandi við fíggjarlógina fyri 2014. Harafturat kunnu vit vænta, at kilogjaldið á sild og makrel eisini verður hækkað í ár. Hóast sagt varð, at hetta kilogjaldi var ein fyribils loysn, inntil funnin verður ein meira varandi loysn, so er hetta landsins lóg, ið vinnufeløgini mugu taka hædd fyri, tí eingin veit við vissu, hvat møguliga kemur ístaðin, ella um hesin eykaskatturin framhaldandi verður galdandi fyri fiskivinnuna.

Higartil hevur skipanin ár um ár ongantíð verið hin sama. Hetta eru ótolandi umstøður hjá vinnuni at arbeiða undir, tí fortreytirnar broytast hvørt ár, og óvissan um, hvussu skipanin verður komandi ár er stór.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur at fyritøkurnar innan alivinnuna og fiskivinnuna á sjógvi og landi, ikki kunnu liva við, at skipanin soleiðis verður broytt hvørt ár, tí tað ger tað torført hjá teimum at leggja virksemi til rættis.

Gongdin seinastu árini hevur tíverri víst, at gjøldini og eykaskatturin alsamt eru hækkað. Tí er vandi fyri, at hetta gerst ein inntøkukelda, sum verður nýtt hvørja ferð landskassanum tørvar pening. Søgan hevur lært okkum, at tá landskassin einaferð er farin at krevja stórar upphæddir inn í gjøldum, verða tey verandi partur av inntøkugrundarlagi landskassans. Tí óttast Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri, at hesi gjøldini hækka uttan fyrilit fyri gongdini í vinnulívinum, men bert við fyriliti fyri javnvág á fíggjarlógini.

Tað hevur stóran týdning fyri føroyskt vinnulív at kunna kappast á jøvnum føti við onnur á heimsmarknaðinum. Tí er tað ikki ein haldgóð

støða, at føroyskt vinnulív verður skattað munandi harðari enn aðrastaðni.

Somuleiðis heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at nú loyvisgjøld og tilfeingisgjøld eru innførd, hevði einasta rætta verið, at sett peningin frá tilfeingisgjøldum í ein búskapargrunn.

### Føroya Arbeiðsgevarafelag ávarar

Tað tykist, at politiska skipanin lagar hesi gjøld og henda eykaskatt til, hvønn tørv landskassin hevur. Føroya Arbeiðsgevarafelag ávaraði longu í 2011 ímóti hesum:

*"Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur harumframt, at tað er ein vandakós, at hesar inntøkur verða nýttar sum afturvendandi fíggingargrundarlag fyri almenna raksturin. Vandi kann vera fyri, at atlit serliga verða tikin til inntøkurnar á fíggjarlógini tað komandi árið, heldur enn at tryggja eina burðardygga veiðu. Stór sveiggj kunnu vera í inntøkum frá tilfeingi ár undan ári, og tað verður tí torført at gera langtíðar fíggjarætlanir. Tað má ikki henda, at politiska skipanin fer at tillaga gjøldini alt eftir, hvat restar í fyri at fáa endarnar at røkka saman í almenna landshúsarhaldinum."* Vinnusjónarmið *"Koyrið so á motorin"* (2011)

Ávaringin frá 2011 tykist tíverri at vera vorðin veruleiki í 2014, og trupulleikin tykist júst at vera, at gjaldið verður ásett eftir tørvinum hjá landskassanum. Tí er álvarsligur vandi fyri, at hetta gerst ein inntøka, ið politiska skipanin fer at tillaga eftir tørvinum hjá landskassanum komandi árini. Tað er ikki ein haldgóð støða hjá vinnulívinum, og Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur ikki, at hetta er ein gongd leið.

Hetta er gjørt uttan, at stig eru tikin til at fáa burturbeint skattalættin til sjófólk, soleiðis sum felagið hevur mælt til. Hetta heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag verða sera óheppið.

### Alivinnan

Í vár varð nýtt uppskot um loyvisgjald á alivinnu samtykt í løgtinginum. Uppskotið

ásetur, at alivinnan skal rinda 4,5 prosent eykaskatti og 0,5 prosent í tøkugjaldi, sum verður tikið av søluvirðinum. Alivinnan mælti heldur til at áleggja eyka skatt á vinningin heldur enn at áseta eitt tøkugjald, um vinnan skal rinda meira. Umboðini hjá landsstýrinum mæltu hinvegin til hægri tøkugjald heldur enn eykaskatt.

Tað er eyðsæð, at eitt tøkugjald kann vera sera óheppið, um hetta verður sett ov høgt. Tá prísurin á alilaksi fellur á eitt meira normalt støðið, verður støðan hon, at feløgini orsakað av tøkugjaldinum skulu gjalda, sjálvt um feløgini ikki hava vinning av alivirkseminum.

Undirtøkan frá alivinnuni fyri skipanini við eykaskatti og tøkugjaldið var tó treytað av, at einkarrætturin hjá Apotekinum at selja heilivág til alivinnuna verður avtikin, men hetta arbeiðið er ikki farið í gongd enn.

Somuleiðis hevur samdur arbeiðsbólkur umboðandi politisku skipanina og alivinnuna eisini mælt til, at politiska skipanin ikki broytir skipanina á hvørjum ári, soleiðis at støðugir karmar verða kring vinnuliga virksemi. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við hesum sjónarmiðunum. Somuleiðis at tað er skilagott at viðgera alivinnuna og fiskivinnuna hvør sær, tí talan er um tvær heilt ymsar vinnur við sera ymiskum fortreytum.

## Fiskivinnan

Í løtuni skal fiskivinnan rinda ein eykaskatt uppá 7 prosent av yvirskoti omanfyri 1 mió. kr. umframt eitt kilogjald fyri sild og makrel. Eitt uppskot er í skrivandi stund til viðgerðar um at hækka kilogjaldið á makrel og sild. Kilogjaldið á sild hækkar eftir ætlan úr 0,35 krónum upp í 0,50 krónur, meðan kilogjaldið á makrel hækkar eftir ætlan úr 0,75 krónum upp í 1 krónu.

Ein trupulleiki við einum føstum kilogjaldi er, at gjaldið ikki tekur hædd fyri, hvat fiskurin kann seljast fyri. Tað kann vera stórur munur á, hvat skipini kunnu avreiða hesi fiskasløg fyri, og hvussu góðskan er ymsar tíðir árinum. Hetta er ikki ein haldgóð skipan, tí at tað fasta kilogjaldið skjótt kann gerast ein stórur partur av søluvirðinum, alt eftir marknaðarviðurskiftum, góðsku og so víðari.

## Tilmæli frá FAG

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at politiska skipanin finnur ein fastan leist, sum eitt møguligt tilfeingisgjald frá fiskivinnuni, verður kravt inn eftir. Somuleiðis at fiskivinnan verður tikið við uppá ráð í einum slíkum føri. Somuleiðis mælir Føroya Arbeiðsgevarafelag til, at peningurin frá slíkum gjaldi verður settur í Búskapargrunn.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði nøkur tilmæli til politisku skipanina í 2011, og felagið mælir framvegis til, at politiska skipanin hevur nøkur av hesum viðurskiftum í huga, tá tilfeingisgjøld verða áløgd fiskivinnuni.

Tilmælini eru:

- Skipan við tilfeingisgjaldi skal ikki taka virkishugin frá teimum vinnurekandi
- Gjaldið skal ikki hava negativa ávirkan á kappingarførið mótvegis umheiminum
- Gjaldið má taka støði í einum staðfestum og áhaldandi vinningi
- Ymiskar fortreytir eru í teimum ymisku pørtunum av vinnuni, og tí má spurningurin um tilfeingisgjald viðgerðast fyri hvønn part sær
- Ein skipan við tilfeingisgjaldi setur krøv til ognarrættin. Tað ber ikki til at krevja tilfeingisgjald fyri ein rætt, sum óvissa er um
- At peningurin frá tilfeingisgjaldi verður settur í Búskapargrunn.

# *Vit mugu seta fokus á marknaðaratgongd*

## Gongdin seinastu árini

Seinastu árini er lítið komið burturúr arbeiðnum at tryggja føroysku útflutningsvinnuni marknaðaratgongd til nýggjar marknaðir.

Tað er tískil alneyðugt, at fokus verður sett á at fáa føroysku útflutningsvinnuni so góðar karmar at virka undir, sum yvirhøvur gjørligt. Her verður bæði hugsað um handilsavtalur við flest møgulig lond og um heilsufrøðiligar avtalur við somu lond. Í dag er støðan tann, at handilsmál og heilsufrøðilig mál ganga hond í hond, og tað nyttar lítið at gera eina handilsavtalu við eitt land, um ikki ein heilsufrøðilig avtala, sum ger tað møguligt at innflyta føroyskan fisk til hetta landið, eisini er uppá pláss. Seinastu árini hevur tað víst seg, at summi lond krevja heilsufrøðiligar avtalur umframt, at tað kann verða neyðugt við handilsavtalum, um so er, at londini, vit kappast við, hava slíkar. Tað er tí, tørvur er á einum tøttum samstarvi millum ráð og stovnar, sum samráðast um handilsavtalur, og tey, sum samráðast um heilsufrøðiligar avtalur.

Gongdin seinastu árini hevur verið, at alt størri partur av føroyska útflutninginum er til onnur lond enn ES-londini. Hetta er gott og ber boð um, at føroyskur útflutningur fleirtáttast alt meira, og at føroyskar fiskavørur eisini koma á stóru marknaðirnar, sum eru í menning, serliga í Eysturevropa og Asiu.

Forðingarnar, sum ES hevur sett fyri føroyskum útflutningi av sild og makreli, er eisini orsøk til hetta, men tó bert ein partur av orsøkini til stóra tørvin, sum vinnan hevur á, at Føroyar fáa fleiri avtalur í lag við onnur lond.

Verðin er stór, men hon er ikki líka stór, tá tað snýr seg um marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur. Fleiri av teimum mest áhugaverdu vakstrarmarknaðunum eru í veruleikanum stongdir fyri føroyskum fiskavørum. Antin tí heilsufrøðiligu avtalurnar ikki eru uppá pláss, ella tí tollurin er hægri, enn hann er fyri kappingarneytarnar úr grannalondunum.

Um hugt verður eftir, hvørjar handilsavtalur Føroyar hava fingið í lag seinastu árini, er Hoyvíkssáttmálin frá 2005 tann seinasti í røðini. Síðani hava Føroyar fingið í lag MFN (Most Favoured Nation) avtalu við Russland og heilsufrøðiliga avtalu við tollsamgonguna millum Russland, Hvítarussland og Kazakstan fyri nøkrum árum síðani. Í eina tíð hevur eisini verið arbeitt fram ímóti at fáa handilsavtalu við tollsamgonguna hjá Russlandi, Hvítarusslandi og Kazakstan, og er tað sera týdningarmikið, at stór orka verður løgd í at koma á mál við hesi avtaluni.

Samstundis hava londini, vit kappast við, fingið handilsavtalur og veterineravtalur við eina røð av samhandilspartnarum.

Tað, sum eyðkennir útflutningin til onnur lond enn ES-londini, er, at munandi tyngri málsgongdir eru, tá virkir og útflytarar skulu góðkennast til hesi lond. Somuleiðis vísir tað seg, at heilsufrøðiligu eftirlitsmyndugleikarnir frá hesum londum hava øðrvísi mannagongdir, enn ES myndugleikar hava, og setir hetta stór krøv til okkara heilsufrøðiligu myndugleikar. Fyri fyritøkurnar líkjast krøvini, sum hesi londini seta, í stóran mun teimum krøvunum, sum krevjandi keyparar sum heild seta fyritøkunum.

Tann sannroynd, at einki røkist fyri at fáa avtalur í lag við onnur lond, kann vera orsakað av, at ov lítil orka verður sett av til at fáa handilsavtalur og heilsufrøðiligar avtalur í lag við lond uttan fyri ES.

Um Landsstýrið ikki raðfestur málið um marknaðaratgongd munandi hægri komandi árini, kann spurningurin verða settur, um tað er ein gongd leið, at Føroyar einsamallar royna at vinna sær marknaðaratgongd, tí føroyski marknaðurin er ikki áhugaverdur sum útflutningsmarknaður hjá teimum, vit royna at fáa avtalur í lag við.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tað er alneyðugt, at munandi størri dentur verður lagdur á hetta arbeiðið ongantíð ov skjótt.

## Hvat sigur útflutningsvinnan?

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í maj 2014 kannað, hvørjar marknaðir føroysku útflutningsfyritøkurnar halda vera umráðandi fyri Føroyar at gera avtalur við.

Fyritøkur innan fiski- og alivinnuna útflyta í dag til nógv ymisk lond kring heimin, men Evropa er framvegis tann størsti marknaðurin. Størstu marknaðirnir eru Frakland, Týskland, Danmark, England, Kina, Spania, Holland, USA, Nigeria og Russland.

Kanning, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt millum fyritøkur, sum útflyta

botnfisk, pelagiskan fisk og laks, vísir, at fyritøkurnar eisini meta onnur lond sum áhugaverdar marknaðir í framtíðini. Millum hesi eru Turkaland ovast á listanum yvir lond handilsavtala eigur at fáast í lag við og Brasil ovast á listanum sum tað landið, sum Føroyar eigur at fáa heilsufrøðiliga avtalu við. Fleiri onnur lond verða eisini nevnd sum áhugaverdir marknaðir. Í dag er tó ikki gjørligt at útflyta til hesar vakstrarmarknaðir orsakað av manglandi handils- og heilsufrøðiligum avtalum.

## Handilsavtalur

Í Turkalandi er tollur ein forðing, tí Føroyar og Turkaland hava onga fríhandilsavtalu, sum hana Noreg og Ísland hava ígjøgnum EFTA. Hetta merkir, at tollur verður lagdur á vøru úr Føroyum, meðan vøran frá fleiri útlendskum kappingarneytum eru tollfríar. Mett verður, at stórur eftirspurningur er í Turkalandi eftir laksi, pelagiskum- og hvítfiski. Í Turkalandi búgva út við 75 mió. fólk.

Kina er í dag ein týðandi marknaður fyri føroyskan útflutning. Føroyar hava tó onga fríhandilsavtalu við Kina. Hetta gerst ein stór avbjóðing, um kappingarneytar okkara gera avtalur við Kina og eftir hetta kunnu útflyta til Kina við ongum ella lægri tolli enn føroyskar fyritøkur. Eitt nú hevur Ísland júst undirskrivað fríhandilsavtalu við Kina, og Noreg hevur í fleiri ár arbeitt við at fáa eina avtalu í lag. Tí er umráðandi, at Føroyar ikki gerast eftirbátur á hesum øki.

## Heilsufrøðiligar avtalur

Útflutningsvinnan metir, at fiski- og alivinnan kann ikki útflyta føroyskan fisk til Brasil, tí neyðugu heilsufrøðiligu avtalurnar eru ikki fingnar í lag. Fyri at lata upp stóra brasilska marknaðin fyri fiskavørur, má avtala gerast millum føroyskar og brasilskar myndugleikar um heilsufrøðilig viðurskifti. Mett verður, at eftirspurningur í Brasil er m.a. eftir toski, longu, brosmu, saltfiski og laksi. Sama støða ger seg galdandi í t.d. Australia, har ein vantandi heilsufrøðilig avtala forðar fyri føroyskum útflutningi. Mett verður ikki, at manglandi handilsavtala við hesi londinum er ein forðing í løtuni.

ES er tó framvegis ein marknaður, ið er áhugaverdur at útflyta til komandi árini. ES bannið, ið varð sett í gildi móti Føroyum í 2013, ávirkar vinnuna. Umframt forboð at selja til ES, so merkir bannið eisini eyka kostnaðir í sambandi við flutning av vøruni til aðrar marknaðir, m.a. tí farmurin skal umskipast, tí onki kann flytast umvegis havnir í ES.

Samanumtikið so vísir kanningin, at føroysku útflutningsfyritøkurnar raðfesta, at fríhandilsavtala verður gjørd við Kina og Turkaland. Hetta tí, at londini, vit kappast við, hava ella eru í ferð við at gera avtalur við hesi lond.

Harumframt er neyðugt at raðfesta heilsufrøðiligar avtalur við fyrst og fremst Brasil og Australia, fyri síðani at meta um, hvør tørvurin er í mun til onnur lond.

# Er vorðið til ein spurning um, hvør skal gjalda

Seinastu tíðina hevur gongdin verið, at í staðin fyri miðvíst at savna seg um at fáa gjørt flest møguligar avtalur innan heilsufrøðiliga økið, verður hugsað um, hvør skal gjalda fyri, at føroyskir myndugleikar arbeiða við hesum, og hvør skal gjalda, tá eftirlitsmyndugleikar aðrastaðni frá koma hendan vegin. Serstøk játtan er ikki til hetta arbeiðið á fíggjarlógini.

Í 2013 vóru umleið 500.000 kr settar av á fíggjarlógini til m.a. at fáa í lag heilsufrøðiliga avtalu við Brasil, men tá til stykkis kom var lítið og einki gjørt við hetta mál, og tí var peningurin ikki brúktur til ætlaða endamálið.

Hetta er greitt tekin um, at landsstýri og løgting eru í holt við at leggja teirra ábyrgd fyri at skapa karmar fyri føroyskum vøruútflutningi frá sær. Hetta heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag als ikki vera í lagi. Tað er landsins uppgáva at taka sær av hesum. Tað er ikki ein spurningur um at tryggja verandi fyritøkum marknaðaratgongd, men at tryggja føroyskum útflutningi bæði nú, men eisini í framtíðini, møguleikan at selja fiskavørur á best gjaldandi marknaðunum. Ein 10 % príshækking á einari vøru er líka týdningarmikil sum ein 10 % hækking í nøgdunum ella kvotunum. Við at fáa betri marknaðaratgongd økjast sannlíkindini fyri, at vit kunnu fáa besta prísin fyri føroysku vørurnar.

Tá boðini herfyri komu um, at kinesiskir eftirlitsmyndugleikar fóru at koma á eftirlitsvitjan, varð samstundis sagt, at um vinnan vil hava møguleika at útflyta til Kina, so má vinnan standa fyri meginpartinum av kostnaðinum av vitjanini. Hetta hóast talan er um karmar fyri føroyskan útflutning sum heild, og ikki bert hjá einstøkum virkjum.

Tað er serstakliga umráðandi, at føroysku myndugleikarnir eru tilvitaðir um ta stóru

ábyrgd, sum liggur á teimum til tess at skapa betri karmar fyri útflutningin. Somuleiðis mugu myndugleikarnir gera sær greitt, at integriteturin hjá eftirlitsmyndugleikanum kann koma í vanda, um hesin gerst tengdur at peningi frá vinnuni fyri at gera sítt arbeiði. Hetta kann koma okkum aftur um brekku. Alt bendir á, at politiska skipanin ikki er greið yvir hesa ábyrgd.

Seinastu árini eru upphæddirnar, sum eru kravdar frá vinnuni í tilfeingisgjøldum, fleirfaldaðar, og alt bendir á, at landsstýrið framhaldandi ætlar at hækka hesi gjøld. Tað líkist tí ongum, at politiska skipanin ikki klárar at finna nakrar fáar hundra túsund krónur at rinda fyri eftirlitsvitjanir, sum eru neyðugar, fyri at Føroyar sum samfelag kunnu fáa betri marknaðaratgongd fyri fiskavørurnar, vit útflyta.

## Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at fokus beinanvegin verður sett á at fáa marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur, herundir bæði handilsavtalur og heilsufrøðiligar avtalur. Mælt verður til at fáa í lag:

- At komið verður á mál við fríhandilsavtalu við Russland, Hvítarussland og Kazakstan
- Fríhandilsavtalu við Kina og Turkaland
- Heilsufrøðuligar avtalur við Brasil og Australia
- At neyðug fíggjarorka verður sett av til økið

# *Føroysk byggivinna – ein vinna við stórum møguleikum*

Seinastu árini hava flest allar vinnugreinar merkt afturgongd ella stagnatión, men serliga byggivinnan hevur verið fyri stórum afturstigi. Talið á starvsfólkum í byggivinnuni fall frá 2007 til 2012 við góðum 725 størvum, og gevur hetta greiða ábending um bakkastið, sum vinnugreinin hevur verið fyri. Í 2013 sær gongdin út til at vera vend, tí yvir 100 fleiri størv eru í vinnugreinini í 2013 í mun til 2012.

Føroyska byggivinnan hevur sum heild ment seg sera nógv seinastu nógvu árini. Alt fleiri føroyskar fyritøkur eru, sum eru førar fyri at bjóða uppá stórar avbjóðandi byggiuppgávur í kapping við stórar útlendskar fyritøkur. Undirskógurin av, eftir føroyskum mátistokki, meðalstóru fyritøkunum er stórur, og tað eru alsamt nýggjar fyritøkur, sum bjóða seg fram. Hetta ber boð um eina vinnugrein í menning, eina vinnugrein, sum er týdningarmikil fyri føroyska búskapin.

Byggivinnan er eisini ein vinnugrein, har tørvurin á starvsfólki við útbúgving økist. Her er t.d. talan um handverkarar innan øll tey ymisku fakøkini, sum neyðug eru fyri at kunna bjóða seg fram til stórar uppgávur, og eisini alsamt fleiri akademisk størv, og við hesum eisini førleikin til at skapa loysnir.

Føroya Arbeiðsgevarafelag er av tí sannføring, at um rætt verður borið at, so kann føroyska byggivinnan mennast enn meira, og enn fleiri arbeiðspláss fáast til vega. Fortreytin er tó, at fyritøkurnar sleppa framat at royna seg, og at viðurskiftini verða løgd soleiðis til rættis, at tað heldur er ein fyrimunur enn ein vansi at vera ein føroysk fyritøka.

## Veljið føroykst

Royndirnar seinastu árini vísa, at tað er ikki altíð so, at tað er ein fyrimunur at vera ein føroysk fyritøka. Byggiharrar hava haft sera góðan hug til at tekkjast útlendskum fyritøkum heldur enn teim føroysku, og dømini um hetta eru fleiri. Nevnast kann útboðið av Biskupstorgi í Klaksvík Marknagilsdeplinum, har alt varð lagt til rættis soleiðis, at tað skuldi vera lætt hjá útlendskum fyritøkum at halda seg framat. Tað vísti seg tó, at tað var ein føroysk fyritøka, sum dróg longsta stráið og er hetta ein staðfesting av, at føroyskar fyritøkur eru kappingarførar.

Sigast skal, at politiska skipanin hevur staðið sína roynd seinastu árini, og signalini frá Løgtinginum um, at leggjast skal soleiðis til rættis, at føroyskar fyritøkur í byggivinnuni skulu hava javnbjóðis møguleikar, hava hjálpt nakað uppá støðuna.

Fyri at ein vinnugrein skal kunna mennast, er tað sera umráðandi, at fyritøkurnar hava hollar royndir á heimamarknaðinum. Um byggivinnan skal bjóða seg fram og gera sær vón um, at tað skal eydnast henni væl á einum útlendskum marknaði, er neyðugt, at fyritøkan kann vísa á, hvørjar stórar verkætlanir fyritøkan hevur verið við til at loys umframt at kunna vísa á, at byggiharrin í

Føroyum, tað veri seg í vinnuni ella í tí almenna, hevur álit á fyritøkuni. Tí hevur føroyski byggiharrin ikki álit á føroysku byggivinnuni, hvussu skal ein útlendskur byggiharri so hava tað?

Nýggjasti spælarin á byggivinnupallinum, Bústaðir, hevur í fleiri umførumført fram, at føroyska byggivinnan ikki er kappingarfør, og at føroyskar fyritøkur ótálmaðar sleppa at skrúva prísin upp, tá tað almenna byggir.

Hesar útsagnir heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag vera skeivar og sera ódámligar og vísir úrslitið av útbjóðingini av Biskupstorgi, at útsagnirnar hjá Bústøðum vóru ógrundaðar. Arbeiðsgevarfelagið tekur sostatt undir við Føroya Handverksmeistarafelag í teirra afturvísing av uppáhaldunum hjá Búðstøðum.

Tað er eingin greining gjørd, sum staðfestur, at føroyskar byggifyritøkur ikki eru kappingarførar, og átti hendan at verið gjørd, áðrenn slíkar útsagnir vórðu bornar fram alment. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur hinvegin, at samanberingarnar, sum verða gjørdar av føroyskari og útlendskari byggivinnu, eru gjørdar av verkætlanum, sum ikki kunnu samanlíknast.

Heldur vísa royndirnar, at tá útboð eru í Føroyum, eru tað føroyskar fyritøkur, sum vinna útboðini, heldur enn tær útlendsku. Eisini í útboðum, sum Bústaðir skipa fyri. Hetta gevur eina ábending um, at tað eru onnur viðurskifti enn tey, sum Bústaðir bera fram, sum ávirka prísin. Um hugt verður eftir miðal avkastinum í byggivinnuni yvir eitt áramál, er tað prógv um, at føroyskar byggifyritøkur ikki skrúva nakran prís upp.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at Bústaðir heldur skuldi umhugsað at hugt eftir, um leisturin, felagið hevur lagt fyri at útvega føroyingum leigubústaðir, er tann rætti, og um felagið røkkur sínum endamálum við hesum leistinum. Spurningurin er eisini um tað ikki hevði verið rættari at Landsverks, sum hevur størstu royndirnar, stendur fyri útboðum vegna Bústaðir, í staðin fyri sum nú at ein nýggjur stovnur skal byggja upp førleikar innan hetta øki.

## Atgongd til arbeiðsmegi

At løgtingið hevur samtykt, at byggivinnan skal hava møguleika at seta arbeiðsmegi úr ES londum í starv, er eisini ein bati, sum kann vera viðvirkandi til, at byggivinnan fær høvi til at konsolidera seg komandi árini. Somuleiðis kann hetta verða við til, at føroysku fyritøkurnar verða betri førar fyri at sleppa framat í grannalondunum, tá manglandi arbeiðsmegi ikki er ein forðing.

Tað er tó samstundis ein avbjóðing hjá byggifyritøkunum at skula lofta útlendskum starvsfólkum, serliga í mun til arbeiðsmál, byggisiðvenjur o.a.

Tørvurin hjá byggivinnuni á arbeiðsmegi kemst millum annað av, at tað eru nógvir føroyskir handverkarar, sum arbeiða í grannalondunum. Orsøkin til, at føroyska arbeiðsmegin velur at arbeiða uttanlands heldur enn í Føroyum, er, at tað skattliga loysir seg betri. Hetta er ikki haldbart, og Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur tað vera neyðugt, at skattligu viðurskiftini hjá føroyingum, sum arbeiða í Føroyum verða javnsett við skattligu viðurskiftini hjá føroyingum, sum arbeiða uttanlands. Verður hetta gjørt, átti tað ikki at verið nakar trupulleiki hjá føroysku vinnuni at kappast um hesa arbeiðsmegina.

Hetta hevði eisini gjørt tað føroyska samfelagið meira lokkandi at flyta til. Politiski myndugleikin hevur latið gjørt eina frágreiðing um tilflyting og fólkavøkstur og eiga viðurskiftini við at gera tað meira lokkandi hjá væl útbúgnum føroyingum at koma heimaftur at raðfestast beinanvegin. Har er skattlig javnseting eitt týdningarmikið átak at fáa gjørt beinanvegin.

## Greiðar reglur og avtalugrundarlag

Fyri at føroyska byggivinnan skal kunna menna seg, soleiðis sum møguleiki er fyri, er eisini neyðugt, at vit hava greiðar reglur og avtalugrundarlag, sum er viðvirkandi til at skapa støðugar karmar kring vinnugreinina.

Í Føroyum hava vit lisitatiónslógina, sum er lógarverkið, og ABF 06, sum er standard avtalugrundarlagið og karmurin um virksemið. Tað er alneyðugt, at byggiharrar og byggivinnan virða hesar karmar og leggja soleiðis til rættis, at gjøgnumskygni og virðing fyri leiklutinum hjá hvørjum øðrum ræður, tá útboð eru, avtalur verða gjørdar, og somuleiðis tá ósemjur eru.

Tað hendir tíverri alt ov ofta, at byggiharrar, eisini stórir byggiharrar, ikki virða hesar spælireglur í sambandi við útboð og sáttmálagerð.

”Man ger soleiðis í Danmark” er ofta at hoyra. Tíverri verður ikki kannað, hvørjar avleiðingar tað hevur haft í hesum londum, sum vit brúka sum fyrimynd. Byggivinnan í Danmark er t.d. druknað í umstingarkostnaðum, og framleidnið í

byggivinnuni er fallið munandi. Donsku vinnugreinafeløgini, bæði innan ráðgevara-vinnu og handverksvinnu, hava ásannað hetta, og tey ávara okkum staðiðliga ímóti at gera somu mistøk, sum tey hava gjørt.

## Tilmæli frá Føroya Arbeiðsgevarafelag

Byggivinnan er ein týðandi vinna fyri føroyska búskapin og umráðandi er, at kamarnar kring vinnuna verða skipaðir, soleiðis at hendan vinnugreinin mennir seg enn meira. Fyri at náa hesum máli er umráðandi, at politiski myndugleikum leggur seg eftir, at førleikin í vinnuni alsamt verður mentur.

Ein háttur at gera hetta er, at tá mett verður um útboð, at samfelagsligu árinini gerast partur av metingargrundarlagnum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til:

- At almennu byggiharrarnir eru tilvitaðir um at bjóða út á ein hátt, soleiðis at føroysk byggi- og ráðgevaravinna kann menna sínar førleikar uppaftur meira.
- At hildið verður fast um at menna verandi lóggávu og avtalugrundarlag í byggivinnuni út frá einum leisti, sum er lagaður til viðurskiftini í Føroyum
- At skattligu viðurskiftini hjá føroyingum, sum arbeiða í Føroyum, verða javnsett við skattligu viðurskiftini hjá føroyingum, sum arbeiða í uttanlands
- At Bústaðir skulu endurumhugsa leistin fyri at útvega leigubústaðir til føroyingar

# Mál í 2013 og 2014

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verða nevnd yvirskipað mál frá farna ári, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið partur av, og sum eru umráðandi fyri vinnuna.

➢ Í fleiri ár hevur verið arbeitt við eini pensjónsnýskipan, sum skal føra við sær, at tvungin eftirlønaruppsparing verður sett í verk fyri allar føroyingar. Í ársfrágreiðingum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag í 2007, 2008 og 2009 varð sagt, at tað sá út til, at uppskot um hetta fór at verða lagt fyri tingið í næstum. Í november 2013 kom lógarpakki til hoyringar og eftirfylgjandi var eftirlønarsamansparing samtykt. Hetta merkir, at frá 1. jan 2014 verður eftirløn at flyta saman við lønini. Eftirlønargjaldið er 1 % í 2014 og hækkar við 1 % um árið upp til 15% í 2028.

➢ Í 2011/2012 arbeiddi Vinnumálaráðið við at orða ein innkeyps- og útboðspolitikk. Endamálið við hesum var at fáa skipað alment innkeyp og alment útboð eftir einum leisti, sum er til fyrimuns fyri vinnu og land. Seinasta heyst vórðu leiðreglur um almennan innkeyps- og útboðspolitikk sendar til hoyringar, og í 2013 varð sokallaði Keypsportalurin tikin í nýtslu. Á Keyps-portalinum verður lýst við almennum útbjóðingum, tá almennir stovnar og stjórnarráð skulu keypa vørur ella tænastur fyri meira enn 800 tús. kr. uttan mvg. Almenn útbjóðing í sambandi við keyp av vørum og tænastum fyri minni enn 800 tús. kr. kann eisini lýsast á keypsportalinum, men hetta er ikki eitt krav.

➢ Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í 2013 luttikið í arbeiðsbólki, sum hevur latið úr honum eina heildarætlan um fólkavøkstur og tilflyting. Seint seinasta vár varð ætlanin løgd fram fyri almenningin.

➢ Í mai í 2013 varð semingslógin frá 1928 loksins dagførd. Semingslógin fevnir nú um allan arbeiðsmarknaðin, og sostatt verða somu semingsfólk á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum. Tingið valdi at samtykkja upprunauppskotið uttan samanteinging og uttan fráboðan áðrenn arbeiðssteðg, men skyldan hjá pørtum í kollektivum sáttmálum at skipa nøktandi trætuloysn sínámillum og skyldan at avtala fráboðanarform og fráboðanarfreist undan arbeiðssteðgi vórðu tó varðveittar.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur síðani fingið áseting um fráboðanarfreist og fráboðanarform inn í fyrstu sáttmálarnar, sum samráðst er um síðani.

➢ Í 2013 var mikil politisk orrusta um Eysturoyartunnulin. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tann hugburð, at tað hevur týdning, at tunnulin verður gjørdur, tí hetta er ein av teimum fáu íløgunum í infrakervi, sum eftir eru at gera í Føroyum, sum kunnu verða viðvirkandi til búskaparvøkstur.

Upprunaliga ætlanin fór fyri bakka, men síðani hevur Løgtingið tikið avgerð um at leggja byggingina av undirsjóvartunnli til Eysturoynna og Sandoynna í alment partafelag.

➢ Í mai 2014 hevur Løgtingið samtykt at seta virkisveð í gildið í Føroyum. Virkisveðið varð sett í gildið í Danmark í 2006, og í Føroyum hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskt eina broyting í tinglýsingarlógini við atliti til virkisveð. Virkisveðið hevur í stuttum við sær, at til ber at fáa fígging úr einum peningastovni mótvegis trygd í tí, ein fyritøka eigur og seinni fer at eiga, uttan at henda veðseting tarnar vanliga rakstrinum (leypandi veð). Fyrimunurin er serliga eyðsýndur hjá fyritøkum við stórum kapitalbindandi goymslum, tí tað hevur verið alt ov umsitingarliga tungt at gera hesa veðsetting áður.

➢ Hin 1. Juli 2014 koma broytingar í útlendingarlógini í gildi, soleiðis at smidligari mannagongdir verða fyri ES-borgarar. Hetta er galdandi fyri handverkarar innan byggivinnuna, tá arbeiðsloysið er undir 6 %, og fyri alla arbeiðsmegi, tá arbeiðsloysið er undir 3,5 %. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fleiri ferðir víst á, at vinnan longu hevur og framhaldandi fer at hava tørv á fólki við røttum førleikum. Tí fegnast vit um, at neyðugu stigini nú eru tikin til at loysa henda samfelagstrupulleikan, bæði serskilt í mun til handverkarar, men eisini generelt fyri alla arbeiðsmegina.

➢ Seinastu 3 árini hevur verið arbeitt við at fyrireika bygging av nýggjum fyrisitingarbygningi til Vinnuhúsið. Í mars í ár varð spakin settur í, og væntandi verður bygningurin klárur til yvirtøku mánaðarskifti juli/august 2014.

# Sáttmálasamráðingar 2013 – 2014

Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum tess varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, fiskivinnan á sjónum tó undantikin.

Størsta sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag. Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu, og leggja tær støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

## Samráðingarrundan 2012 – 2014

Tá ársfrágreiðingin 2013 varð skrivað, vóru tvey sáttmálaøki, sum ikki vóru komin uppá pláss í samráðingarrunduni 2012 – 2014. Hesi vóru sáttmálarnir fyri manningar við farma- og ferðamannaskipum og fyri føroysk miðlafólk.

## Samráðingar við manningarfeløgini

Hósdagin 14. juni 2013 undirskrivaðu Reiðarafelagið fyri Farmaskip og Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Sjómannadeild Føroya Fiskimannafelags undir nýggjan tvey-ára sáttmála.

Umframt tillagingar og broytingar í sjálvum sáttmálanum hevði semjan við sær eina lønarhækking á 1,13 % 1. mars í 2013 og 1,89 % 1. mars 2014, sum er á sama støði sum hinir sáttmálarnir í samráðingarrunduni.

## Samráðingar við Føroysk Miðlafólk

Seinasta semjan í samráðingarrunduni 2012 – 2014 varð gjørd 26. november 2013. Semjan var millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroysk Miðlafólk. Eisini henda semja var á sama støði, sum allar hinar semjurnar í runduni, tað vil siga ein lønarhækking 1. november 2013 á 1,13 % og ein lønarhækking 1. november 2014 á 1,89 %. Øll hækkingin varð løgd á sjálva lønina.

## Samráðingarrundan 2014 – 2016

Samráðingarrundan 2014 – 2016 byrjaði við samráðingunum við tey fimm arbeiðarafeløgini. Áðrenn tað av álvara varð farið undir samráðingarnar, vórðu partarnir samdir um eina avtalu um fráboðanarfreist. Avtalan ásetur, at um ein partur ætlar at seta arbeiðssteðg í verk, skal hetta verður fráboðað mótpartinum minst 48 tímar undan arbeiðssteðginum. Roknað verður til á middegi, um fráboðað verður fyri middag, ella til á midnátt, um fráboðað verður eftir middag.

Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um hetta stóra stigið framá fyri føroyska arbeiðsmarknaðinum. Trupulleikin við at virkir lógu still undir samráðingum, hóast einki verkfall var, eigur við hesi avtalu at vera munandi minni.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur nú 40 sáttmálar við 19 fakfeløg. Hesir sáttmálar fevna sum nevnt um allan privata arbeiðsmarknaðin, fiskiskip undantikin.

## Samráðingar við arbeiðarafeløgini

Partarnir, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag, undirskrivaðu nýggjar 2-ára sáttmálar 6. mai 2014.

Umframt tillagingar í sáttmálunum og í álitisfólkaskipanini var semja um at hækka lønirnar 1. mai 2014 við 2,20 krónum og 1. mai 2015 við 2,60 krónum. Eisini var eftirlønin hækkað við 0,1 %, soleiðis at hon nú er 10 %.

Afturat teimum sáttmálum, sum longu eru í gildi, vóru partarnir samdir um at gera ein sáttmála, sum er galdandi fyri aling av laksi og smolti á sjógvi og landi. Hesin sáttmáli hevur reelt við sær, at røkt innan alivinnuna ikki verður rakt av einum møguligum verkfalli.

Karmurin, sum varð lagdur fastur við hesum samráðingunum, varð 1,98 % fyrsta árið og 2,25 % annað árið. Hetta er sostatt tað, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur at halda seg í til í øllum komandi samráðingum í samráðingarrunduni 2014 – 2016.

## Samráðingar við Maskinmeistarafelagið um sáttmálan á landi

Hin 23. mai, ein knappan mánaða eftir at samráðingarnar við arbeiðarafeløgini vóru lidnar, undirskrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Maskinmeistarafelagið sáttmála galdandi fyri maskinmeistarar á landi. Eisini hesin sáttmáli var ein 2-ára sáttmáli, sum gongur frá 1. juni 2014 til 1. juni 2016, og hevði semjan við sær somu hækkingar sum fyri arbeiðarafeløgini.

## Komandi Sáttmálasamráðingar

Teir sáttmálar, sum eftir eru í verandi samráðingarrundu, eru við hesi feløg:

- Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna
- Súlan
- Starvsmannafelagið
- Flogskiparafelag Føroya
- YTF
- Finansforbundet
- S & K
- Grafiska Yrkisfelagið
- Føroya Skipara- og Navigatør felag
- Maskinmeistarafelagið
- Føroya Fiskimannafelag
- Føroysk Miðlafólk

Samráðingarrundan endar, tá sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini fara úr gildi 1. mai 2016.

# Tiltøk 2013-2014

## Vinnunám

Vinnunám er skeiðstænastan hjá Vinnuhúsinum. Her verður skipað fyri skeiðum og kunningardøgum til limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Endamálið við Vinnunámi er at økja um fakliga førleikan hjá fyritøkum - bæði á leiðslustøði, og eisini innan ítøkiligar partar av gerandisdegnum í eini fyritøku.

Vinnunám hevur lagt seg eftir at bjóða limunum skeið og kunningardagar, sum eru beinrakin og viðkomandi fyri vinnuna á einum ítøkiligum støði.

Hetta seinasta árið hevur verið skipað fyri einum trimum kunningartiltøkum fyri limirnar í Føroya Arbeiðsgevarafelag og undirfeløgum tess. Ein kunningarfundur var um nýggja keypsportalin, har kunnað var um, hvussu vinnan kann brúka portalin. Egon Joensen, fulltrúi í Fíggjarmálaráðnum, stóð fyri kunningini. Annar kunningarfundur var um praktisku avleiðingarnar av nýggju eftirlønarlóggávuni. Í hesum sambandi vóru tað starvsfólk á TAKS og frá føroysku eftirlønarveitarunum, sum greiddu frá. Somuleiðis skipaði Føroya Arbeiðsgevarfelag fyri einum kunningarfundi um Horizon 2020 í samstarvi við Granskingarráðið. Tað vóru starvsfólk á Granskingarráðnum, sum greiddu vinnuni frá møguleikunum, sum nýggja granskingarætlanin hjá ES hevur.

Føroya Arbeiðsgevarfelag hevði eisini ein bás á tiltakinum Jobmatch 2013. Hetta er afturvendandi tiltak, sum Vinnuhúsið hevur verið við til at fyriskipa, fyri geva høvi hjá lesandi í Føroyum og uttanlands at koma í samband við føroykst vinnulív.

## Vinnudagurin 2013

Hetta var 14. ferð, at skipað varð fyri Vinnudegnum. Tað er framvegis týdningarmikið at halda fast við henda eina dagin um árið, har føroysk vinna kann vera saman um hetta, sum onkur hevur kallað hátíðardagur vinnunar. Luttøkan var góð, og dagurin væleydnaður.

Á Vinnudegnum vóru sum vanligt Ársins Virki og Ársins Átak kosin.

**Dómsnevndin valdi P/F Vest Pack til Ársins Virki 2012. Grundgevingin hjá dómsnevndini var hendan:**

“Ja, so ber ikki til at pakka tað inn longur. Sum tit júst hava sæð, hevur dómsnevndin í ár avgjørt at velja P/F Vest Pack úr Vestmanna til Ársins Virki 2013. Fyritøkan varð sett á stovn í 1994, og høvuðsvirksemið er, umframt vørur til føroysku húsarhaldini, plast- og etikettframleiðsla til matvøruframleiðslu og aðra vinnu í Føroyum. Harafturat selur fyritøkan eisini eina røð av øðrum vørum til vinnuna.

Verandi eigarar keyptu og løgdu saman Vestpack og Farpak í 2007 og hava miðvíst arbeitt við at fáa betri rakstur og betri úrslit ár um ár. Og hetta er eydnast til fulnar, hóast marknaðarin tíðum hevur verið heldur turbulentur. Botnlinjan hjá fyritøkuni er seinastu árini betrað munandi.

Úrslitini hjá Vest Pack eru prógv um, at tað eisini ber til hjá smærri fyritøkum at skapa góð úrslit við miðvíst at leggja seg eftir at gera alt eitt sindur betur hvørt einasta ár. Hetta hevur haft við sær, at ognar- og eginpeningsavkastið hjá Vest Pack er millum tey bestu í Føroyum, og tað hevur rós uppiborið.

Tað nýggja buzz-orðið innan leiðslumenning er “eksekvering”, sum einfalt merkir “tað tú gert fyri at røkka settum málum”. Og hóast leiðsla og starvsfólk í Vest Pack í dagliga virkseminum kanska ikki tosa so nógv um eksekvering, er tað m.a. hetta, sum skapar góðu úslitini hjá fyritøkuni.

Ein av styrkjunum hjá Vest Pack er fleksibilitetur í framleiðsluni, har fyritøkan kann tillaga framleiðsluna eftir føroyska marknaðinum, og t.d. kann framleiða minni nøgdir til kappingarførar prísir. Harumframt kann Vest Pack eisini framleiða skjótt, tá ordrin hevur skund.

Hetta hevur haft við sær, at tað hevur eydnast lutfalsliga lítlu fyritøkuni úr Vestmanna at klára seg í hørðu kappingini við størri fyritøkur í útlandinum. Eisini uttanlands byrja tey at fáa eyguni upp fyri fyritøkuni úr Vestmanna, og 20-25 % av søluni hjá Vest Pack er nú til kundar uttanlands.

Tað er tó framvegis á heimamarknaðinum, at Vest Pack hevur meginpartin av virkseminum. Vest Pack luttekur í “Keyp føroyskt” átakinum, sum m.a. skal vísa á, at vit hava nakrar fyritøkur í Føroyum, sum framleiða dygdarvørur til ein kappingarføran prís. Posarnir hjá Vest Pack eru eisini væl dámdir millum fólk, ikki minst í hesum døgum, tá slaktið nærkast, og vit hava brúk fyri sterkum posum til tað, sum frystast skal. Ja, vit kunnu siga, at posarnir eru líka seigir sum vestmenningarnir sjálvir.

Úrslitini hjá Vest Pack kunnu tæna sum fyrimynd hjá okkum øllum: tað ber til at taka kappingina

upp við útlendskar framleiðarar og klára seg væl. Eg eri tí fegin um at kunna ynskja Jóan Magnus Olsen og Áka Olsen frá Vest Pack tillukku við heiðrinum sum Ársins Virki 2013."

**Ársins Átak 2013 var Koks. Í grundgeving síni segði dómsnevndin m.a.:**

"Hvat er góðska? Hetta er ein afturvendandi spurningur, tá ein fyritøka skal leggja eina framleiðslu til rættis, og leggja seg eftir einum ávísum góðskustøði. Eitt slag av góðsku er at geva kundunum tað, sum teir vænta. Eftir hesum hugtakinum er góðska heilt einfalt at gera kundarnar nøgdar, við at bjóða teimum tað, sum teir vænta frammanundan. Og tað er ikki altíð líka lætt.

Eitt annað slag av góðsku er, at geva kundunum nakað, sum teir ikki væntaðu. At bjóða kundunum nakað, sum teir ikki vistu, at teimum dámdu ella høvdu brúk fyri. Hetta slagið av góðsku er kanska uppaftur torførari at fáast við. Tú kanst ikki spyrja kundarnar frammanundan, hvat teir vilja hava, ella hvussu spesifikatiónirnar skulu vera. Tú mást heilt einfalt trúgva uppá, at tað sum tú gert er so serligt, at kundarnir verða ovfarnir og til reiðar at gjalda meira fyri at gerast ovfarnir. Hetta slagið av góðsku setur serlig krøv til framleiðsluna, tí hon krevur alla tíðina nýhugsan, og at nýggjar standardir verða settar fyri vøruna ella tænastuna. Tí kundarnir keypa ikki bara frá tær, tí teir vilja hava somu høgu standard sum seinast, men tí teir aftur hesuferð vilja vera ovfarnir av tí, tú hevur at bjóða.

Vit hava fleiri fyritøkur í Føroyum, sum velja hesa kósina í teirri framleiðslu, men fáar hava gjørt tað so gjøgnumført sum Ársins Átak 2013. Og tað hevur bæði ført til undran og viðurkenning í Føroyum og uttanlands. Tí sum so ofta í Føroyum, eigur tað ikki at bera til. Tað eigur ikki at bera til at hava eitt symfoniorkestur í Føroyum. Tað eigur ikki at bera til at hava ein svimjara, sum kappast við tey bestu í heiminum. Tað eigur ikki at bera til at hava eitt fótbóltslandslið, sum bjóðar teimum stóru av. Og tað eigur ikki at bera til at hava matstovur við so høgari góðsku sum nakrar av teimum, vit hava í Føroyum.

Dómsnevndin hevur í ár valt at heiðra eina av hesum matstovum sum Ársins Átak 2013. Dómsnevndin heldur seg ikki taka munnin ov fullan við at staðfesta, at hetta er flaggskipið innan føroyska matlist.

Av stórfingnum varðum á leiðini kann verða nevnt, at Ársins Átak hevur verið á heimsins bestu matstovu og givið kokkunum har íblástur til nýggjar fiskarættir. Ein bók um matstovuna er kosin ársins bókaútgáva í danska kongaríkinum. Og matstovan er í uppskoti sum besta matstova í ríkinum, í kapping við nakrar av heimsins bestu matstovum. Vit tosa sjálvandi um matstovuna KOKS.

Tú kemur bara so langt, sum KOKS er komið, um tú megnar at bróta upp úr nýggjum og gera kundarnar ovfarnar. Hetta krevur framskygd fólk, sum ganga á odda, og saman við hesum eitt lið, sum er til reiðar at lyfta í felag.

Konseptið hjá KOKS er møguliga sprottið úr manifestinum um nýnorrønan mat, sum norðurlendskir kokkar orðaðu fyrst í hesari øldini, men KOKS er í dag meira enn tað. Ræstir smakkir og klassiskar fiskarávørur verða nýtulkaðar og settar saman á ein hátt, so gestirnir vera ovfarnir. Og alla tíðina verður arbeitt út frá einum einfaldum konsepti, har tað líka nógv snýr seg um at taka burtur sum at leggja afturat. Hví ikki vera ósmæðin og kalla tað nýføroyskan mat?

KOKS er partur av samtakinum Gist og Vist, sum rekur matstovu-, gistingarhús- og ferðavinnuvirksemi. Hóast KOKS fær heiðurin sum Ársins Átak, viðurkennir dómsnevndin tó samstundis tann týdning, sum virksemið hjá øllum samtakinum hevur fyri føroyska samfelagið. Uttan virksemið í samtakinum vóru Føroyar ikki líka áhugaverdar at vitja og at búgva í. Harumframt er tað ikki vist, at KOKS var á tí støði tað er, um matstovan ikki kundi standa á herðunum á hinum fyritøkunum í samtakinum.

Dagurin í dag er tó fyrst og fremst dagurin hjá KOKS. Eg eri tí fegin um at bjóða Jóhannes Jensen og Leif Sørensen fram her at taka ímóti heiðrinum sum Ársins Átak 2013".

# Gongdin innan ymisku vinnugreinarnar

## *Fiski- og flakavinnan*

### Útflutningurin

Samlaða útflutningsvirðið á øllum fiskavørum var í 2013 uml. 5,8 mia. kr. í mun til uml. 5 mia. kr. í 2012. Tað er serliga útflutningsvirðið á alilaksi, sum orsakað av prísgongdini í 2013 er vaksið munandi.

Samlaða útflutta tonsatalið av fiskavørum øktist eisini nakað í 2013 í mun til 2012. Tað er serliga útflutta nøgdin av sild, sum øktist í 2013 í mun til árið fyri.

Samlaða útflutningsnøgdin av frystum og køldum flaki, úr toski, hýsu og upsa, var tilsamans eitt vet lægri í 2013 samanborið við 2012. Tað var nøgdin av upsaflaki, sum var orsøkin til minkingina, tí nøgdin av flaki av øðrum fiskasløgum hækkaði nakað, hóast hon framvegis eru á einum sera lágum støði.

Útflutningsvirðið av hesum vørum minkaði meira enn nøgdin. Flaktur toskur og hýsa fingu ein betri prís pr. kg, meðan hýsa og onnur fiskasløg fingu verri prís. Um hugt verður eftir útflutninginum av hesum botnfiskasløgunum undir einum, fall miðalprísurin. Eisini miðalprísurin fyri saltfisk minkaði.

### Rávørutilgongdin

Talvan niðanfyri vísir, at nøgdin í føroysku feskfiskaveiðuni aftur minkaði í 2013, og er nú á umleið sama støði sum í kreppuárinum 1993. Feskfiskaveiðan var í 2013 knapt 73.000 tons, sum er eini 10.000 tons minni enn í 2012.

Serliga tá tað snýr seg um botnfiskasløgini tosk og hýsu, er framvegis ringur standur. Toskur og hýsa eru stak illa fyri, og fiskiskapurin eftir hesum fiskasløgum er bert ein viðfáningur av tí, hann var fyri nøkrum árum síðani. Eftir at fiskiskapurin eftir hýsu minkaði átta ár á rað, vaks hann aftur eitt vet. Framvegis er tó talan um sera lág veiðutøl. Veiðinøgdin í 2003 var knøpp 25.000 tons, meðan hon í 2013 bert var góð 3.000 tons.

Nøgdin av upsa er minkað við umleið 8.000 tonsum, og er eisini munandi lægri enn fyri fáum árum síðani, hóast stovnurin sigst at vera hampuliga væl fyri. Nøgdin á flatfiski minkaði eisini nakað.

Avreiðingartølini higartil í ár geva ongar ábendingar um nakran serligan bata.

Samlaða avreiðingarvirðið av feskfiskaveiðuni var uml. 630 mió. kr. í 2013 í mun til 774 mió. í 2012. Miðal avreiðingarprísurin var sum heild nakað lægri í 2013 í mun til 2012.

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr | | Miðalprísur pr. kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2012** | **2013** | **2012** | **2013** | **2012** | **2013** |
| **Toskur** | 8.556 | 9.857 | 127.813 | 123.790 | 14,94 | 12,56 |
| **Hýsa** | 2.613 | 3.209 | 30.012 | 37.333 | 11,49 | 11,63 |
| **Upsi** | 32.376 | 24.562 | 287.316 | 194.572 | 8,87 | 7,92 |
| **Annar botnfiskur** | 178 | 106 | 1.802 | 856 | 10,15 | 8,11 |
| **Flatfiskur tils.** | 4.546 | 4.012 | 112.933 | 99.894 | 24,84 | 24,90 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 13.781 | 16.184 | 64.191 | 76.692 | 4,66 | 4,74 |
| **Veiðan tilsamans** | 82.253 | 72.630 | 773.762 | 630.012 | 9,41 | 8,67 |

Kelda: www.hagstova.fo

## Flakavinnan

Sum tað sæst í brotinum omanfyri, vóru nøgdirnar av feskfiski undan Føroyum í 2013 á umleið sama støði sum í kreppuárinum 1993. Hóast partar av flakavinnuni fyri at viga upp ímóti lægri rávørunøgdum hava innflutt frystan fisk úr útlandinum til virkingar, er hetta ein fíggjarliga dýrari loysn. Keypiorkan er enn nakað lág í Evropa, og marknaðaratgongdin til aðrar marknaðir er verri enn hjá okkara kappingarneytum. Samanumtikið er eingin ivi um, at viðurskiftini hjá flakavinnuni eru sera avbjóðandi.

Avbjóðandi karmarnir hjá vinnuni síggjast eisini aftur í fíggjarligu úrslitunum hjá flakavinnuni. Ikki allir roknskapir fyri 2013 hjá flakavirkjunum eru tøkir enn, og hugt er tí eftir tølunum fyri 2012.

Um hugt verður eftir ársúrslitunum hjá fyritøkunum undir einum, var tilsamans talan um eitt hall á uml. 50 mió kr. fyri hesar 11 fyritøkurnar.

Á myndini niðanfyri sæst ársúrslitið áðrenn óvanligar postar og skatt hjá 11 fyritøkum. 6 fyritøkur høvdu avlop, meðan 5 høvdu hall.

**Úrslit hjá 11 fyritøkum í fiskiídnaðinum í 2012**




Kelda: www.bl.fo

## Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli fyri fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2013/2014 skrivaði Havstovan um toskastovnin á landgrunninum, at gýtingarstovnurin hevur verið sera lítil síðani 2005. Hóast ein lítil vøkstur er, er hann nær minsta markinum fyri, hvat er ráðiligt. ICES hevur í sínum tilmæli mælt til, at veiðitrýstið verður minkað við 69 %. Eingin ivi er sostatt um, at toskastovnurin er illa fyri.

Havstovan skrivar eisini, at toskurin á Føroyabanka framvegis er illa fyri, og hóast ábending um lítlan bata mælir Havstovan framvegis til, at eingin toskafiskiskapur verður loyvdur á Føroyabanka.

Hýsustovnurin er eisini sera illa fyri og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Hýsustovnurin hevur síðani 2010 verið undir markinum fyri, hvat er lívfrøðiliga ráðiligt, og gýtingarstovnurin hevur ongantíð verið so lítil sum nú. Sjálvt við ongari veiðu fer hann at halda seg undir minstamarkinum.

Upsastovnurin verður mettur at vera hampuliga væl fyri, hóast gýtingarstovnurin er minkaður munandi síðani 2005. Veiðutrýstið eftir upsa er tó framvegis ov høgt.

Yvirskipað mælir Havstovan til, at ein umsitingarætlan verður gjørd, sum m.a. ásetur, hvørji tiltøk skulu setast í verk, tá gýtingarstovnurin minkar niður um ávísa stødd, so gýtingarstovnarnir kunnu koma fyri seg aftur.

Samanfatandi mælti Havstovan til, at parkera óbrúktar fiskidagar hjá skipabólkum, sum serliga veiða tosk og hýsu. Harumframt mælir Havstovan til at skerja dagatalið hjá bólkunum 3, 4 og 5 við 30 % av teimum brúktu døgunum, sum liður í einari ætlan at stilla veiðitrýstið rætt. Eisini verður mælt til, at dagatalið hjá bólki 2, sum serliga fiskar upsa, verður skert við 10%. Harumframt mælir Havstovan til at brúka aðrar reguleringar fyri at geva smáfiski betri møguleikar at vaksa seg inn í fiskiskapin.

Samanumtikið mugu vit ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski og hýsu eru vánalig, og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðinøgdin av toski og hýsu undir Føroyum ikki verður størri í 2014 í mun til 2013.

Upsastovnurin verður sagdur at vera hampuliga væl fyri, men higartil í 2014 hevur upsafiskiskapurin verið á sama lutfalsliga lága støði sum í 2013.

## Marknaðurin

Tað, sum hevur eyðkent 2013, er tørvandi marknaðaratgongd til marknaðir, sum eru, ella sum kunnu blíva, týdningarmiklir fyri føroyskan útflutning.

Tað hevur stóran týdning at tryggja føroyskum fiskavørum marknaðaratgongd kring allan heim, serliga á teimum áhugaverdastu marknaðunum. Støðan í dag er hon, at okkara kappingarneytar hava munandi betri marknaðaratgongd, enn føroyskir fiskaútflytarar hava. Tá so marknaðurin í Evropa viknar, m.a. tí keypiorkan minkar, hava Føroyar ikki somu møguleikar sum aðrar fiskivinnutjóðir at selja til nýggjar, áhugaverdar marknaðir. Tað krevur tí eitt miðvíst og áhaldandi arbeiði hjá føroysku myndugleikunum í samstarvi við vinnuna til tess at lata upp marknaðir, sum í dag eru stongdir fyri føroyskum fiskavørum. Góð marknaðaratgongd er ein fortreyt, um vit vilja tryggja, at vit fáa besta prís og mest virði fyri útflutta fiskin.

# *Alivinnan*

Alivinnan er framvegis væl fyri, og fíggjarligu úrslitini seinastu árini hava verið góð. Framleiðslunøgdin hevur verið vaksandi við undantaki av 2010, og laksaprísurin hevur verið á einum lutfalsliga høgum støði seinastu árini.

Føroyska alivinnan kann vísa á nøkur av heimsins bestu úrslitum viðvíkjandi vøkstri, felli, fóðurfaktori, sjúku, framleiðslukostnaði og prísi. Samanborið við aðrar alitjóðir hevur føroyska alivinnan sera góð úrslit á teimum flestu økjunum.

Gongdin seinastu árini hevur verið, at alsamt færri feløg eru í vinnuni, og í dag eru fýra alifeløg í Føroyum. Karmarnir um alivinnuna eru sum heild góðir, men tað er av alstórum týdningi, at alivinnan framhaldandi leggur dent á skynsaman rakstur við neyvari framleiðslustýring.

Í 2013 varð amøban parameoba perurans staðfest í fleiri alibrúkum Føroyum. Amøban kann elva til táknusjúkuna AGD, men tann sjúkan er framvegis ikki staðfest í Føroyum. Eftir ársskiftið var ILA-virusið eisini staðfest í einum alibrúki, men einki bendir á, at virusið hevur spjatt seg til onnur alibrúk. Hóast hesar tilburðir er einki økt felli staðfest í føroyskum alibrúkum av hesum orsøkum, og tann yvirskipaða sjúkustøðan er framvegis góð.

Síðan 2006 er framleiðslan av føroyskum alifiski økt støðugt – bert í 2010 var ein lítil minking í framleiðsluni. Framleiðslan av laksi var í fjør 62.246 tons í kruvdari vekt. Framleiðslan var sostatt eitt vet lægri enn í 2012, tá framleiðslan var 62.783 tons. Søluvirðið øktist hinvegin úr 1,81 mia. kr. í 2012 upp í 2,4 mia. kr. í 2013. Hetta er ein munandi vøkstur uppá umleið ein triðing. Meðan nøgdin stóð í stað, øktist søluvirðið, og 2013 hevur tískil verið eitt gott ár hjá føroyskari alivinnu.

Í 2014 verður roknað við einum lítlum vøkstri í tí samlaða útboðnum í heiminum. Orsøkin er, at lítil vøkstur er væntandi í Noregi, Kili, Bretlandi og Norðuramerika. Støðan á heimsmarknaðinum hevur síðan 2010 annars verið merkt av øktum útboði og harvið minkandi miðalprísi. Hetta broyttist tó í fjør, tá miðalprísurin aftur øktist. Útlitini í 2014 eru, at prísurin fer at halda sær á einum rímuliga høgum støði, av tí at vøksturin í útboðnum er lítil.

Í 2013 vórðu umleið 13,7 mió. smolt sett út.

Hetta er nakað minni enn í 2012, tá umleið 15 mió. smolt vórðu sett út. Tøkan av laksi verður væntandi sløk 70.000 tons í kruvdari vekt í 2014, og tað er nakað hægri enn í 2013.

**Tøka av laksi og sílum 1996-2013 (rund vekt)**




| | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 1,44 | 1,26 | 3,29 | 1,31 | 3,12 | 11,1 | 10,2 | 5,09 | 4,49 | 5,48 | 7,64 | 9,00 | 8,80 | 2,38 | 0,00 | 0,00 | 0,96 |
| Laks | 20,3 | 19,2 | 39,3 | 33,5 | 46 | 45 | 52,5 | 41 | 19 | 13,1 | 22,3 | 38,8 | 51,5 | 45,4 | 60,4 | 76,8 | 75,8 |

Kelda: Avrik við Rúna Dam

## Útflutningsvirðið

Søluvirðið í 2013 var góðar 2,4 mia. kr. samanborið við 1,81 mia. kr. í 2012. Søluvirðið er sostatt økt munandi í 2013 og hevur givið feløgunum góð úrslit. Samanumtikið hevur 2013 verið eitt gott ár við støðugari framleiðslu og høgum miðalprísi.

Myndin niðanfyri vísir, at útflutningsvirðið á alifiski er økt hvørt ár síðani 2006. Útflutningsvirðið á alifiski í 2003 var eina slaka milliard krónur. Í 2005 og 2006 varð útflutningsvirðið minkað niðurum hálva milliard krónur fyri síðani at økjast hvørt ár. Í 2009 var útflutningsvirðið slakar 1,4 milliardir krónur, og hóast tøkan í 2010 varð væl lægri enn í 2009, so var útflutningsvirði eitt vet hægri. Í 2013 var útflutningsvirðið umleið 2,4 mia. kr., og so stórt hevur útflutningsvirðið av alifiski ongantíð verið áður. Laksur er í dag størsta einstaka útflutningsvøra hjá Føroyum og stendur fyri umleið 40 prosentum av tí føroyska vøruútflutninginum.

Útlitini komandi tíðina verða mett at vera hampuliga góð, tí at útboðið á heimsmarknaðinum ikki økist munandi.

**Útflutningur av alifiski í virði frá 2003 til 2013 (1.000 kr.)**




Kelda: www.hagstova.fo

# Handverksvinnan

## Gongdin í handverksvinnuni

Lønargjaldingarnar í byggivinnuni raktu botnin í 2010, men eru síðani kvinkaðar nakað uppeftir aftur. Frá 2012 til 2013 stóðu lønargjaldingarnar tó at kalla í stað.

Talvan niðanfyri vísir gongdina í lønargjaldingum innan byggivinnuna frá 2008 til 2013. Tað sæst í talvuni, at parturin hjá byggivinnuni av samlaðu lønargjaldingunum er minkaður javnt og samt seinnu árini, úr 13,6% í 2008 niður í 10,9% í 2013.

**Lønarútgjaldingar í byggivinnuni 2008-2013**

| Vinnugrein | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Skipasmiðjur, smiðjur | 162,0 | 131,4 | 127,9 | 131,1 | 155,8 | 153,1 |
| Ídnaður annars | 252,3 | 236,6 | 218,3 | 207,5 | 207,2 | 207,6 |
| Bygging | 542,0 | 449,3 | 414,6 | 429,2 | 419,6 | 422,3 |
| *Tilsamans* | **956,3** | **817,3** | **760,8** | **767,8** | **782,6** | **783** |
| | | | | | | |
| **% av samlaðum lønargjaldingum** | 13,6% | 12,2% | 11,2% | 11,2% | 11,1% | 10,9% |
| % vøkstur í lønargj, handverksvinnan | 3,7% | -14,5% | -6,9% | 0,9% | 1,9% | 0,1% |

Kelda: www.hagstova.fo

Um hugt verður eftir tali av løntakarum heldur enn lønarútgjaldingum, er gongdin nakað tann sama. Talið av løntakarum í byggivinnuni er minkað í stórum seinastu árini, men minkaði bert eitt vet frá 2012 til 2013.

Um hugt verður eftir innflutninginum av tilfari til byggivinnuna síggja tølini eitt sindur øðrvísi út.

Tað var nevniliga ein ávísur vøkstur í innflutninginum av byggitilfari í 2013 í mun til 2012. Hetta kann møguliga geva eina ábending um, at ein vøkstur í vinnuni stendur fyri framman í 2014.

**Innflutningur av tilfari til byggivirksemi**




Kelda: www.hagstova.fo

Tað er eingin fullfíggjað sethúsa- ella bygningsskráseting, og besta ábendingin um, hvussu nógv sethús eru bygd í einum ávísum ári, fæst tí við at hyggja eftir skrásetingum av gjøldum til SEV fyri (ný)íbindingar í elkervið. Henda skráseting er bólkað í sethús og “annað”, sum fevnir um vinnu- og almennar bygningar, íbúðir, neyst, úthús v.m., umframt víðkanir av verandi innleggingum.

Myndin niðanfyri vísir, at frá 2001 til 2006 lá talið av nýbygdum sethúsum millum 200 og 250 eindir.

Árini 2007 og 2008 vaks talið av nýbygdum sethúsum, men síðani hevur minking verið í talinum á hvørjum ári.

Í 2013 var talið av nýbygdum sethúsum tað lægsta síðani aldarskiftið. Seinastu 2 árini eru góð 70 % av nýbygdu sethúsunum bygd í Streymoynni.

**Nýbygging 2000 - 2013**




Kelda: www.hagstova.fo

## Útlit fyri handverksvinnuna

Fíggjar- og búskaparkreppan seinastu árini hevur haft við sær, at virksemið í samfelagnum sum heild er minkað, og hetta hevur rakt handverksvinnuna serliga meint. Tað hevur í slíkum tíðum stóran týdning, at bygging og viðlíkahaldsarbeiði hjá tí almenna verður raðfest ovarlaga, so nakað av virksemi framhaldandi er í byggivinnuni.

Hóast tað almenna nokk so tíðliga avgjørdi at økja um íløgukarmin, hevur tað tíverri víst seg at ganga long tíð frá tí, at avgerðin um at játta peningin er tikin, til verktætlanirnar verða settar í verk. Nú eru almennu verkætlanirnar loksins við at koma í gongd, samstundis sum fleiri byggiverkætlanir eisini eru í privatu vinnuni. Útlitini hjá byggivinnuni fyri 2014 og komandi árini eru tí munandi frægari enn í árunum frammanundan.

Tað kann gerast ein avbjóðing at finna faklærda arbeiðsmegi í Føroyum til allar hesar verkætlanir, tí eitt stórt tal av handverkarum hava leitað sær arbeiði í Noregi og aðrastaðni, meðan virksemið í byggivinnuni í Føroyum var so lítið. Tað er tó ein bati, at Løgtingið hevur samtykt at lætta um atgongdina at fáa handverkarar úr ES til Føroya at arbeiða.

## Shippingvinnan

Talið av skipum, sum eru skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskrásetingini, hækkar alsamt og er nú komið upp á 90 skip. Til samanberingar kann verða nevnt, at fyri fimm árum síðan, í 2009, vóru bert 33 skip skrásett í FAS. Vøksturin stendst bæði av, at útlendsk reiðarí flyta virksemi sítt til føroysk feløg og skráseta síni skip í Føroyum, men hann stendst eisini av, at onnur føroysk reiðarí hava og fara í komandi árum at økja skipatalið.

At so nógv skip nú eru skrásett í FAS-skipanini hevur sjálvsagt sína positivu ávirkan á avleidda virksemið og t.d. arbeiðspláss fyri føroyskar sjómenn. Eisini skapar henda vinna nýggj vitunararbeiðspláss á landi. Búskaparliga íkastið av avleidda virkseminum av FAS byrjar nú av álvara at síggjast aftur í føroyska samfelagnum, so sigast má, at í mun til endamálið við skipaskránni, so gongur eftir ætlan.

Tað er tí týdningarmikið, at øll, sum vara av FAS-skipanini, leggja seg eftir at varðveita støðugar og góðar karmar um hana, soleiðis at føroyska altjóða skipaskrásetingin og harvið vinnan kring hesa hevur bestu gróðrarmøguleikar í framtíðini. Um FAS-skipanin framhaldandi skal skilja seg frá øðrum líknandi skipanum og vera kappingarfør, hevur tað týdning, at lógarverkið verður gjørt við atliti til veruleikan sæddan við føroyskum eygum, og at umsitingin av reglunum, sum ávirka skipanina, verður framd við støði í føroyskum viðurskiftum.

Tað er lítið at ivast í, at reglur og umsiting av lógarverkinum í okkara grannalondum taka støði í teirra lokalu viðurskiftum. Framhaldandi má tí ansast eftir, at reglur í londunum kring okkum ikki einans verða umskrivaðar til føroyskt mál, men eisini umskrivaðar til føroysk viðurskifti har tað er neyðugt.

Føroyar mugu tó syrgja fyri, at okkara lóggáva heldur altjóða sáttmálar og krøv annars, um vit ynskja at vera partur av altjóða handilsflotanum. Í farna árið hevur nógv orka verið nýtt til at fáa sett í gildi lógarbroytingar og kunngerðir í Føroyum til tess at uppfylla treytirnar í Maritime Labour Convention, sum kom í gildi 20. august 2013.

Samanumtikið ber til at siga, at shipping nú gevur sítt til føroyska samfelagið, og um myndugleikar og vinna framhaldandi halda sær fyri eyga, at Føroyar skulu gerast ein verulig shippingtjóð, verður týdningurin av shipping í Føroyum enn størri í tíðini, sum kemur.

## Oljuvinnan

Einki borivirksemi var á føroyska landsgrunninum í 2013. Í 2014 verða tó tvær boringar. Hin fyrra er byrjað, og snýr tað seg um Statoil, sum borar Brugdan 2 brunnin, sum sett var á í 2012, lidnan. Síðani verður farið undir at bora Súlan/Stelkur brunnin.

Tað er sostatt útlit til eitt spennandi summar við nógvum borivirksemi. Sermerkt fyri hesa boring er, at stórt sæð allar avtalur um veitingar til boripallin eru við føroyskar veitarar. Hetta er greitt tekin um, at føroyskar fyritøkur standa seg væl í altjóða oljuvinnuni, og føroysk arbeiðsmegi er sum heild væl umtøkt í frálandavinnuni.

Tilgongdin til oljuvinnu í Føroyum hevur í heila tikið eydnast væl, tí hóast vit onga olju framleiða enn, so er oljuvinna millum størstu vinnugreinir í Føroyum. Nýggj greining vísir, at heili 942 føroyskir løntakarar starvast innan oljuvinnuna. Hetta er væl at merkja, teir føroyingar, sum hava sín bústað í Føroyum. Afturat hesum koma teir føroyingar, sum eru búsitandi aðrastaðni. Størsti parturin av arbeiðsmegini er mannfólk. Í 2013 starvaðust 25 konufólk og 917 mannfólk innan oljuvinnuna.

| Arbeiðsmegin | 2012 | 2013 |
|---|---|---|
| Tal av løntakarum | 858 | 942 |
| % av arbeiðsmegini | 3,61 | 4 |

| Arbeiðsgevarar | 2012 | 2013 |
|---|---|---|
| Føroyskir arbeiðsgevarar | 608 | 674 |
| Útlendskir arbeiðsgevarar | 250 | 268 |

| Arbeiðsøki | 2012 | 2013 |
|---|---|---|
| Offshore | 349 | 361 |
| Onshore í Føroyum | 70 | 65 |
| Onshore uttanlands | 194 | 243 |

Kelda: Virkisráðgeving (VRG), kanning frá 2013

Verandi kolvetnislóg virkar sum heild væl, og tørvur er ikki á at kolvelta hana og leistin, hon er skorin eftir. Tað er tó hóskandi at taka upp spurningin um, hvussu vit menna okkum uppaftur meiri á hesi leið. Samstundis kann spurningurin um, hvussu henda luttøka í altjóða oljuvinnu kann verða skipað í samljóði við virksemi heima í Føroyum, verða viðgjørdur.

Avbjóðingin er at skapa felags fyrimunir fyri eina oljuvinnu og fyri føroyska samfelagið, og mælt verður til, at ein ætlan verður gjørd fyri, hvussu ein komandi oljuvinna verður føroyska samfelagnum mest at gagni.

## *KT-vinnan*

Hyggur ein eftir gongdini hjá KT-vinnuni í Føroyum tey seinastu árini, so ber til at staðfesta, at vøksturin hevur verið millum lítil og eingin. Undantikið fjarskiftisveitararnar, ið kunnu vísa á nøktandi úrslit, so hava aðrir partar av vinnuni – samlað sæð - ikki megnað at økt søluna ella yvirskotið. KT-felagið metir tó, at møguleikin fyri munagóðum vøkstri er til staðar, men neyðugt er við ávísum tiltøkum fyri at seta ferð á menningina.

Landafrøðiliga nýtist KT-vinnan ikki neyðturviliga at vera tengd at marknaðinum í Føroyum, tí til ber at menna og selja skipanir tvørtur um landamørk. Hetta merkir í roynd og veru, at møguleikarnir eru markleysir, og at vøksturin í føroyska búskapinum ikki eina nýtist leggja lunnar undir vøkstrinum í KT-vinnuni. Føroyar sum smátjóð hevur við sær teir fyrimunir, at skipanir lættliga kunnu mennast, royndarkoyrast og betrast innanvert oyggjarnar við tí fyri eyga, at selja hesar uttanlands. Skipanirnar kunnu tá mennast innan lutfalsliga smáu karmarnar í Føroyum, har stutt og einfalt er at samskifta millum partar, samstundis sum ein samfelagslig heild fæst við í menningina.

Sum eitt dømi kundu tað almenna og KT-vinnan farið í samstarv um at talgilda og effektivisera partar av almenna geiranum í Føroyum. Ikki einans hevði virðisøkingin tá verið eyðsýnd bæði fyri tað almenna og KT-vinnuna her á landi, men uttanlands kundi ein væleydna føroysk verkætlan eisini verið dragandi. Ein av fortreytunum fyri eini effektivari talgilding av almenna geiranum er standardisering av talgildum samleikaprógvum.

Verður hugt at búskaparliga landslagnum í løtuni, so sæst, at næstan hvørt land í Mið- og Suðurevropa stríðist við at halda vøkstrinum á almenna geiranum niðri, tí hesin tyngir ríkisfíggjarætlanirnar í ríkiligt mát. Tá kundi ein slóðbrótandi almennur geiri í Føroyum gjørt sítt til, at KT-vinnan fekk luft undir veingirnar uttanlands.

Eisini hava KT-fyritøkur fyrr víst á, at trupult er at fáa serfrøðingar heim til Føroya at arbeiða innan KT-vinnuna. Er neyðuga arbeiðsmegin ikki tøk, kann tað tarna vøkstrinum í vinnuni. Ein loysn er at gera eina serfrøðingaskattaskipan, ið eggjar serfrøðingum til Føroya við einum tíðaravmarkaðum skattalætta. Tílikar skipanir finnast í øðrum Norðurlondum, og hóast landsins

mynduleikar ikki enn hava tikið hetta tilmæli til sín, so er tað nevnt í álitinum, sum varð skrivað um fólkavøkstur. Tískil vónar vinnan, at politiska sjóneykan verður sett á hetta mál innan ov rúma tíð.

## Samskiftisvinnan

Fíggjarkreppan, sum hevur leikað seinastu árini, hevur stórliga merkt samskiftis- og lýsingarvinnuna. Í stuttum kann sigast, at tað eru tveir stórir veitarar á marknaðinum saman við einum støðugum tali av minni veitarum - í fleiri førum einstaklingavirkir.

Vegna væntandi hagtalsgrundarlag er torført at vísa á ein ítøkiligan vøkstur ella fall í vinnugreinini, men afturmeldingar frá vinnuni eru, at eftirspurningurin í 2013 er størri enn undanfarin ár.

Ein týdningarmikil hending í 2013 var, at almennu Føroyar meldaðu út, at marknaðarføring, branding og samskifti eru ein íløga, sum er við til at skapa úrslit.

Her verður hugsað um, at Visit Faroe Islands fekk økta játtan júst til hetta.

Hetta sær samskiftisvinnan sum ein greið staðfesting av, at marknaðarføring og samskifti ikki bert er ein útreiðsla, men ein íløga, sum ger mun. Við hesum gongur tað almenna á odda, og eru hetta sera jaligir tónar fyri samskiftisvinnuna.

## Ráðgevaravinnan

Eftir eitt tíðarskeið við fáum uppgávum við niðurlaging av ráðgevaravinnuni sum fylgju, er virksemið í vinnugreinini við at taka seg uppaftur.

Talið av ráðgevaravirkjum og starvsfólkum í vinnuni í Føroyum er vaksandi og ber hetta boð um vaksandi eftirspurning eftir ráðgevara-tænastum.

Talið av starvfólkum, ið umsita byggi-verkætlanir í teknisku umsitingunum hjá kommunum og landinum, veksur eisini. Hetta er tekin um, at byggiharrin ikki brúkar vinnuna í tann mun, tað ber til, men heldur velur at loysa part av uppgávunum innanhýsis, sum vinnan eins væl kundi loyst.

Ráðgevarafelagið hevur arbeitt støðugt við at fáa gjøgnumskygni í sambandi við tilluting og døming av útboðum. Smáir batar hava verið at sæð, men enn manglar nakað áðrenn støðan er nøktandi.

## Handilsvinnan

Innflutningurin til handilsvinnuna (undantikið bilar) fór eitt vet upp í 2013 í mun til 2012. Talan var um eina øking uppá góðar 52 mió. kr. Innflutningurin av persónbilum vaks tó við 21%, svarandi til 40 mió. kr. Gongdin á samlaða innflutninginum til Føroya sæst niðanfyri.

| Innflutningur(1.000 kr.) | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Allur innflutningur | 4.210.856 | 4.369.891 | 5.278.862 | 6.660.439 | 6.268.031 | -392.400 | -5,89% |

Kelda:www.hagstova.fo

| Innflutningur (1.000 kr.) | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Hálvdrúgvar nýtsluvørur | 167.890 | 166.642 | 166.775 | 169.091 | 183.181 | 14.090 | 8,33% |
| Drúgvar nýtsluvørur | 159.435 | 150.898 | 151.951 | 151.166 | 162.885 | 11.818 | 7,82% |

Kelda: www.hagstova.fo

## Drúgvar og hálvdrúgvar vørur

Innflutningurin av drúgvum og hálvdrúgvum nýtsluvørum er vaksin eitt sindur í mun til 2012.

Sambært greiningum frá 2013, sum Vinnuhúsið hevur gjørt við at seta seg í samband við fyritøkurnar í vinnugreinini, sæst, at flestu fyritøkurnar høvdu ein støðugan umsetning í tíðarskeiðnum 2011 til 2012. Hetta samsvarar eisini væl við innflutningstølini. Ein slík greining er ikki gjørd í 2014, men hagtølini fyri 2013 vísa, at innflutningurin er vaksin væl meira frá 2012 til 2013 enn undanfarin ár.

Hetta ber boð um, at tað eisini innan matvøruvinnuna er ein øktur eftirspurningur í 2013 í mun til undanfarin ár.

At kalla allar fyritøkur í handilsvinnuni hava tálmað rakstrarútreiðslurnar á øllum økjum seinastu árini. Serliga eru tað marknaðarførings-útreiðslurnar, sum eru skornar nógv, eins og lønarútreiðslurnar eisini eru minkaðar. Sambært fyritøkunum er marknaðurin ikki so óstøðugur, sum hann var í tíðarskeiðinum 2008 – 2010.

## Ódrúgvar vørur

Sum tað sæst á talvuni niðanfyri, hevur innflutningurin av matvørum verið støðugt vaksandi síðani 2009.

Tó sæst ikki nakar serligur stórur vøkstur í 2013 í mun til undanfarin ár.

| Matvøruvinna - detail | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Matur, drykkjuvørur og tubbak | 503.233 | 511.308 | 526.927 | 542.718 | 559.302 | 16.584 | 3,06% |
| Aðrar ódrúgvar nýtsluvørur | 141.561 | 140.058 | 139.563 | 137.351 | 142.546 | 5.195 | 3,78% |

Kelda: www.hagstova.fo

## Søla av bilum

Sølan av bilum plagar at vera ein ábending um, hvussu búskapurin hevur tað, og um vanligi brúkarin hevur álit á framtíðina.

Tað er líkt til, at støðan er vorðin betri seinastu tvey árini. Sølan av nýggjum bilum í 2013 er vaksin við 21% í mun til 2012. Sølan er nú við at koma upp á sama støðið, sum í 2008, tá ið 1.948 nýggj akfør vóru seld. Samlaði innflutningurin øktist úr 158 mió. kr. í 2012 til 198 mió. kr. í 2013.

| Nýggj akfør seld | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | Munur | % |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Stk. | 1.053 | 1.135 | 1.218 | 1.527 | 1.852 | 325 | 21,28% |

Kelda: www.akstovan.fo

# *Ferðavinnan*

Seinastu árini hevur ferðavinnan verið í eini tilgongd, har nýggir lunnar skuldu leggjast undir vinnuna. 2013 var eitt vegamót í so máta. Í stórum skuldi nýggj strategi leggjast fyri vinnuna,

eitt nýtt brand gerast fyri Føroyar sum ferðamál, og bygnaðurin í Ferðaráðnum broytast, soleiðis at Ferðaráð Føroya gjørdist alment partafelag.

Nýggja brandið og strategiin vórðu løgd fram fyri vinnuna á sumri 2013. Móttøkan var stórfingin og fegnast varð um felags leistin, ið var avdúkaður í framløguni. Høvuðsboðskapurin í strategiini er, at størsta forðingin fyri Føroyar sum ferðamannaland er, at alt ov fá vita av Føroyum.

Tí er týdningarmesta avbjóðingin hjá ferðavinnuni at gera Føroyar sjónligar í útheiminum. Ferðaráðið hevur tí altjóða marknaðarføring sum høvuðspunkt í nýggju strategiini og fer at brúka nærum alla sína orku til hetta endamálið.

Víðvíkjandi umskipanini av Ferðaráðnum til alment partafelag er júst komið á mál við hesum í mai 2014. Vinnan er ikki eigari í partafelagnum, sum upprunaliga ætlað. P/F Visit Faroe Islands er eitt 100% alment partafelag.

Frá 1. januar 2013 hevur Hagstova Føroya aftur havt ábyrgdina av at savna inn hagtøl fyri gistingar í Føroyum. Lyklatøl fyri hvønn týdning ferðavinnan hevur fyri tjóðbúskapin, tal av arbeiðsplássum og líknandi fara eisini at verða gjørd, men tey eru ikki tøk enn.

**Gistingarnætur í 2013**

| | Gistingarhús | Ból og biti | Íbúð/hús | Kamping | Íalt |
|---|---|---|---|---|---|
| Danmark | 39048 | 606 | 8101 | 334 | 48069 |
| Føroyar | 23746 | 123 | 12293 | 3385 | 39547 |
| Noreg | 6819 | 72 | 1081 | 40 | 8012 |
| Týskland | 4353 | 386 | 1730 | 806 | 7275 |
| Ísland | 3997 | 24 | 950 | 211 | 5182 |
| Stóra Bretland | 3465 | 186 | 792 | 159 | 4602 |
| Svøríki | 3271 | 42 | 111 | 53 | 3477 |
| Italia | 931 | 145 | 442 | 30 | 1548 |

Kelda: Hagstova Føroya

Meginparturin av gistandi ferðafólkunum í Føroyum kemur úr grannalondunum, meiri enn helmingurin úr Danmark. Samlaðu gistingarnar í Føroyum vóru í 2013 130.771 í tali. Til samanberingar kann nevnast at tað, sambært tølunum hjá Ferðavinnufelagnum fyri 2012, sum skulu takast við fyrivarni, vóru umleið 99.000 gistingar í 2012.

Enn er tað ov tíðliga at meta um, hvørt nýggja strategiin hevur borið vøkstur við sær. At tølini tala fyri seg, er eisini at taka munnin ov fullan, tí tølini, sum samanborið verður við, hevur Ferðavinnufelagið sjálvt savnað saman. Innsavningin hevði ikki heimild í lóg, og tískil eru tølini ikki nóg álítandi til samanberingar, men tey geva eina ábending um gongdina. Hinvegin verður tað áhugavert at fylgja við tølunum komandi árini, tá ið betri grundarlag er fyri samanberingum.

Flestu ferðafólkini gista á gistingarhúsum í Suðurstreymi. Gistitalið var hægst í juni, juli og august. Restina av árinum er rúm fyri væl fleiri vitjanum.

**Gistital (belegningur) á gistingarhúsunum**




Kelda: Hagstova Føroya

## Hvat er eftir at gera?

Gongdin í føroysku ferðavinnuni hevur verið góð seinastu tíðina. Flogvøllurin er longdur, nýggja flogvallarfarstøðin verður liðug í næstum, meira er gjørt burtur úr hentleikunum á umborð á Norrønu, og nýggj strategi er ávegis frá Atlantic Airways. Spurningurin er so, um flutningsførið millum Føroyar og útheimin stendur mát við hetta. Ferðavinnan hevur førleika til at veita tænastur til nógv fleiri ferðafólk. Avbjóðingin er hinvegin at fáa tey til landið, og tá mugu flutningsmøguleikarnir ikki vera ein forðing.

Annað mál, sum fokus eigur at verða sett á komandi tíðina, er kostnaðarstøðið í føroysku ferðavinnuni í mun til í grannalondunum.

Tað er bæði avmarkandi fyri úrval og góðsku umframt kostnaðarmikið fyri matstovurnar, at alt innkeyp av drykkivørum gongur gjøgnum Rúsdrekkasølu Landsins. Vinnan heldur, at Føroyar eiga at fáa somu reglur sum í til dømis Svøríki og Noregi, har til ber hjá heilsølum at innflyta drykkjuvørur. Hetta fyri at fáa lægri prísir og serliga betri úrval.

Eisini er kostnaðurin hjá ferðafólki at leiga bil í Føroyum hægri enn eitt nú í Danmark. Hetta kemst av, at tað í Føroyum ikki er møguligt at innflyta avgjaldsfríar bilar til bilaútleigan. Um hetta var gjørligt, kann tað eisini hugsast, at standurin á leigubilunum hækkaði ella prísurin lækkaði.

Vinnan fegnast um, at eftirlýsta kósin fyri føroysku ferðavinnuna er komin á beint, og at vinnan nú virkar undir tryggum og mennandi karmum. Hóast ferðavinnan er merkt av framfýsni, ber ikki enn til at siga, hvørja ávirkan nýggja brandið hevur ført við sær.

Nýggja strategiin legði upp til eina nýggja marknaðarføringstilgongd, sum hevur verið nýtt í vinnuni til at marknaðarføra seg við í 2014. Tískil siga tølini fyri 2013 ikki so nógv enn. Hinvegin verður tað áhugavert at síggja úrslitini fyri 2014. Tá kunnu vit betur meta um, hvørt føroyska ferðavinnan veruliga hevur fingið luft undir veingirnar.

## *Peningastovnarnir*

Bankar og sparikassar eiga sín týðandi leiklut í samfelagnum. Ein leiklutur, ið gevur sítt íkast umvegis tey ársverk, ið eru tengd at virkseminum, og tí virðisøking framleidd umvegis veittu tænastuna. Harumframt virka peningastovnarnir sum fíggjarligir millumliðir, ið umsita gjaldførið í landinum. Peningur kann trygt latast inn, og møguleiki er at taka lán, tá ið umstøðurnar loyva tí. At fólk kunnu keypa sær eini hús uttan at eiga allan peningin á bók, og at fyritøkur kunnu keypa útgerð áðrenn vøran er seld. Hesin fíggingarmøguleiki er grundarsteinur handan vøkstri og framburði. Í Føroyum hava vit fýra peningastovnar, ið virka í javnari kapping við hvønn annan, og eins og aðrar vinnufyritøkur ynskja at skapa ein burðardyggan vinning.

Miðaltalið av starvsfólkum í 2013 var 685 starvsfólk, og talan er sostatt um eina lutfalsliga stóra vinnugrein í føroyskum høpi.

## Raksturin

Peningastovnarnir høvdu eitt samlað ársúrslit í 2013 á 209 mió. kr. Hetta er nakað betri enn í 2012, tá ið samlaða úrslitið gjørdist 160 mió. kr. Samstundis er at gleðast yvir, at allir fýra peningastovnarnir megnaðu eitt yvirskot í 2013.

At bæði fyritøkur og húsarhald ynskja at styrkja sín javna (niðurgeara) sæst aftur á samlaðu útlánunum í peningastovnunum, sum stigvíst fellur. Í 2012 taldu samlaðu útlánini 18,1 mia. kr., ímeðan talið vísur 17,3 mia. kr. í 2013. Innlánini eru tó eisini fallin úr 21,6 mia. kr. í 2012, niður í 20,4 mia. kr. í 2013.

Allir peningastovnarnir siga seg verða trýstar á rentuinntøkini, og vænta teir ikki ein vøkstur í yvirskotinum næsta ár. Útlit eru tí fyri einum yvirskoti álíknandi yvirskotinum í ár, har dentur framhaldandi verður lagdur á eina effektivisering av rakstrinum.

Samstundis er lønarhæddaravgjaldið hækkað úr 10% upp í 12% við ársbyrjan av 2013, og hetta setur enn størri trýst á peningastovnarnar. Í 2012 taldu miðalársverkini 757, men hesi eru fallin niður á 685 í 2013.

### Rentustøðið

Tjóðbankarentan (diskontorentan) hevur seinastu árini verið søguliga lág og hevur síðani juli 2012 ligið á 0,00%. Ilt er at spáa um rentustøðið, men útlit eru ikki fyri, at rentan hækkar stórvegis í 2014.

Renturnar á mest sum øllum lánum í føroysku peningastovnunum eru stigvíst lækkaðar í 2013. Lægsta rentan á 1. veðrættið er í mai 2014 komin niður á 3,4%, og er hetta lægsta bústaðarrentan nakrantíð í Føroyum. Lækkingin er so eyðsýnd, at hon hevur gjørt sítt til at brúkaraprístalið er fallið í 2013. Hetta hevur við sær, at netto rentuinntøkan hjá peningastovnunum kemur undir trýst, men lættir samstundis um fíggjarliga hjá kundunum.

## Lønarhæddaravgjald

Løgtingið samtykti í desember 2009 at hækka lønarhæddaravgjaldið frá 5% til 10%. 1. jan. 2013 var lønarhæddaravgjaldið aftur hækkað frá 10% til 12%. Sostatt hava vit hægsta lønarhæddaravgjald í Evropa.

Við hesum eru kappingarfortreytirnar hjá føroysku peningastovnunum verri enn áður. Henda eykaútreiðsla skal javnvigast onkustaðni, og okkurt bendir á, at hetta ávirkar talið av samlaðu ársverkunum.

**Lønarhæddaravgjøld 2005 til 2013**

| DKK 1.000 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønarhæddaravgjald | 13.648 | 15.390 | 17.112 | 16.585 | 32.350 | 34.571 | 34.631 | 36.171 |
| Broyting | 1.015 | 1.742 | 1.722 | -527 | 15.770 | 2.216 | 60 | 1540 |

Kelda: www.gjaldstovan.fo,
Landsroknskapir 2005-2012

Gongdin við útlánum, eins og undanfarin ár, er tann sama. Fólk og fyritøkur vísa enn stórt varsemi, og eftirspurningurin at lána pening er ikki serliga stórur, hóast renturnar eru lækkaðar munandi. Merkisvert er, at samlaðu innlánini eru eisini lækkaði við uml. 5,6%.

Høvuðsorsøkin er tann, at Eik hevur rindað aftur 1.044 mió. kr. til lán við statsveðhaldi, bólkað sum innlán.

Eisini hevur ein lægri innlánsrenta møguliga havt sína ávirkan á, hvar peningur verður settur.

**Útlán og innlán í peningastovnunum**

| Teir føroysku peningastovnarnir | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Innlán | 14 | 15 | 18 | 21,5 | 22,6 | 20,4 |
| Útlán | 18,1 | 17,3 | 18,9 | 18,8 | 18,1 | 17,3 |

Kelda: Ársroknskapir

## SIFI-skipanin

Fíggjarmálaráðið hevur saman við donskum mynduleikum avgjørt, at eyðmerkja tríggjar av føroysku peningastovninum við SIFI-spjaldrinum (Systematically Important Financial Institution). Hetta merkir m.a., at hesir peningastovnar skulu lúka strangari kapitalkrøv, fáa oftari vitjan av Fíggjareftirlitinum, og skulu leggja eina tilbúgvingarætlan fyri, hvussu farast skal fram, um stovnurin kemur í trupulleikar. Tað mest eyðsýnda við SIFI-skipanini eru tey herdu krøvini til solvensin, ið stigvíst skulu lúkast innan 2019, soleiðis at peningastovnarnir gerast meiri mótstøðuførir, og ikki taka ov stóran útlánsváða á seg. Endamálið er at avmarka árinið á samfelagsbúskapin og at tryggja, at samfelagið verður fyri so lítlum missi sum møguligt, um so er, at ein SIFI-peningastovnur kemur í fíggjarligar trupulleikar.

Áheitanir um trotabúðarviðgerð ella innheinting umvegis fútaræ ttin eru minkaðar í 2012.

## Virkisveð

Uppskotið um virkisveð bleiv samtykt av løgtinginum í mai 2014, og er hetta eitt týdningarmikið átak fyri at betra um fíggingarmøguleikarnar hjá føroyskum vinnu-fyritøkum.

Við fyriverandi tinglýsingar-lóggávu var sjálvdan ráðiligt at veðseta t.d. vørugoymslir ella áogn hjá debitorum, tí hvør lutur ella fakturi skuldi eyðmerkjast. Hetta hevði við sær, at ein fyritøka kundi koma soleiðis fyri, at henni varð noktað fígging vegna manglandi trygd, hóast samlaðu ognir hennara vórðu nøktandi. Við virkisveðnum er hinvegin talan um eitt flótandi veð, ið ikki tarnar vanliga raksturinum, og kann hetta serliga koma væl við hjá teimum fyritøkum, ið hava lutfalsliga virðismiklar vørur á goymslu. Tó at virkisveðið júst er sett í gildið í Føroyum, so er hetta ikki eitt nýtt fyribrigdi, tí longu í 19. øld varð virkisveðið (floating charge) nýtt í Bretlandi. Í dag finst veðið, undir ymiskum treytum, í flestu vesturlendsku londum.

**Trotabúðarviðgerðir 2006 til 2012**

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Áheitanir um trotabúðarviðgerð | 3319 | 3331 | 2747 | 4038 | 2993 | 2975 | 1954 | 2759 |
| Harav panting | 1828 | 2109 | 1113 | 1677 | 395 | 1363 | 716 | 2640 |
| Tvingsilssølur av fastari ogn | | 6 | 7 | 13 | 12 | 38 | 33 | 42 |

Kelda: Føroya Rættur

Áheitanir um trotabúðarviðgerð ella innheinting umvegis fútaræ ttin eru øktar í 2013, sæð í mun til 2012. Í 2.759 førum gjørdust viðkomandi partar annaðhvørt samdir, gjørdu eina gjaldsavtalu, ella gjørdi rætturin ein úrskurð. Í 2.640 førum var ein niðurstøða tikin av fútaræ ttinum, t.d. tikið pant í ognum.

# Um Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið og feløgini annars

Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar. Felagið arbeiðir fyri, at føroyskt vinnulív hevur teir bestu møguleikarnar at kappast, mennast og virka. Við samráðingum og sáttmálum tryggjar Arbeiðsgevarafelagið samstundis góðar og støðugar arbeiðsmarknaðar-karmar fyri vinnuna.

Í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru føroyskar fyritøkur umframt arbeiðsgevarasamskipanir limir. Arbeiðsgevarasamskipanirnar eru Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðju-felag, Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum og Reiðarafelagið fyri Farmaskip.

Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at arbeiða fyri:

- **Felags sáttmálum fyri vinnuna:** Vegna vinnuna ger Arbeiðsgevarafelagið sáttmálar við løntakarafeløgini. Hesir tryggja støðug viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og tálma lønarvøkstur í mestan mun.

- **Vinnupolitiskum kørmum:** Vegna vinnuna verður arbeitt við, at ávirka allar lógir, kunngerðir og ásetingar annars, sum landsstýri, løgting, umsiting, stovnar og kommunur seta í verk, soleiðis at hesar tæna og ikki darva vinnuni. Vinnufeløgini eru m.a. umboðað í nógvum ymiskum nevndum, ið seta karmar fyri føroyska samfelagið og framtíð okkara.

- **Kunning:** Arbeiðsgevarafelagið veitir kunning um privatu vinnuna, vinnulig viðurskifti og tann týdning, vinnan hevur fyri samfelagið, bæði beinleiðis og gjøgnum føroyskar miðlar.

- **Ráðgeving og tænasta:** Felagið veitir limum sínum ráðgeving og tænastur á ymiskum økjum: starvsfólkaviðurskifti og leiðsla, sáttmálar, lógir og reglugerðir á vinnuøkinum v.m. Eisini virkar umsitingin í Vinnuhúsinum sum sambindingarlið við vinnu í øðrum londum.

- **Fundir og orðaskifti fyri leiðslurnar innan vinnuna:** Felagið hevur átikið sær leiklutin at vera miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti. Skipað verður fyri ymiskum tiltøkum, har bond verða knýtt millum leiðarar í privatu vinnuni - eisini tá húsið er karmur um vitjanir uttaneftir.

Lógir og virðisgrundarlagið hjá felagnum eru lýst á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum, www.industry.fo.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag. Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum av Vinnuhúsinum. Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreina-feløgunum, sum húsast saman í Vinnuhúsinum.

# Hvør húsast í Vinnuhúsinum?

Í dag eru 18 virkin feløg undir sama taki í Vinnuhúsinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta hugsan, at tað hevur týdning at savna føroyska vinnu undir einum taki. Hetta fyri at føroyska vinnan skal hava sterkari samleika í samfelagnum gjøgnum felags umboðan.

**Arbeiðsgevarafeløgini eru:**

| Arbeiðsgevarafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Føroya Arbeiðsgevarafelag | Marita Rasmussen |
| Føroya Handverksmeistarafelag (íroknað Havnar Handverksmeistarafelag) | Niels Winther |
| Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum | Esther Dahl |
| Føroya Prentsmiðjufelag | Esther Dahl |
| Reiðarafelagið fyri Farmaskip | Esther Dahl |

Høvuðsuppgávan hjá arbeiðsgevarafeløgunum er at føra sáttmálasamráðingar við fakfeløgini vegna limirnar og at ráðgeva limunum í sáttmálaspurningum.

Harafturat arbeiða arbeiðsgevarafeløgini eisini við arbeiðsmarknaðarmálum og yvirskipaðum vinnukørmum.

**Vinnugreinafeløgini eru:**

| Vinnugreinafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Havbúnaðarfelagið | Stefan í Skorini |
| Føroya Ráfiskakeyparafelag | Niels Winther |
| Handilsvinnufelagið | Marita Rasmussen |
| KT-felagið | Carl Herup Olsen |
| Oljuvinnufelagið | Esther Dahl |
| Samskifti | Jórun Gardar Bringsberg |
| Ráðgevarafelagið | Marita Rasmussen |
| Ferðavinnufelagið | Birita Johansen |
| Felagið Peningastovnar | Carl Herup Olsen |
| Oljutingið | Mikkjal Joensen |
| Virðisbrævamarknaður Føroya P/F | Jórun Gardar Bringsberg |

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri teirra vinnugrein.

Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

## Føroya Reiðarafelag og Felagið Nótaskip

Seinastu árini hevur Felagið Nótaskip húsast í Vinnuhúsinum og frá 1. mai 2013 eisini Føroya Reiðarafelag.

# Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag setur karmarnar fyri arbeiðnum í Vinnuhúsinum.

Í nevndini sita:



**Bergur Poulsen, formaður**

Bergur Poulsen er nevndarformaður og nevndarlimur í fleiri fyritøkum í føroyskum vinnulívi. Bergur Poulsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



**Høgni Hansen, næstformaður**

Høgni Hansen er stjóri í heilsølufyritøkuni Poul Hansen. Høgni Hansen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011 og sum næstformaður felagsins síðan tá. Høgni Hansen er nevndarlimur í Handilsvinnufelagnum og var eisini nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið.



**Kristoffur Laksá, nevndarlimur**

Kristoffur Laksá er saman við øðrum eigari í prentsmiðjuni Estra í Gøtu. Kristoffur Laksá er, umframt at hava samráðingarleiðsluna í sambandi við sáttmálasamráðingarnar hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, eisini næstformaður í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



**Magni Arge, nevndarlimur**

Magni Arge er nevndarformaður í Oljuvinnufelagnum umframt at vera nevndarlimur í fleiri føroyskum fyritøkum. Magni Arge hevur verið stjóri í flogfelagnum Atlantic Airways í 19 ár og hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1998.



**Jón Sigurdsson, nevndarlimur**

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Jón Sigurdsson hevur verið nevndarlimur í Havnar Handverksmeistarafelag fram til 19. Mars 2014 umframt nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.



**Atli Gregersen, nevndarlimur**

Atli Gregersen er saman við øðrum eigari av fyritøkunum Luna, Fútaklettur og Fiskavirkinum. Atli Gregersen er stjóri í alifyritøkunum Luna og Fútaklettur. Atli Gregersen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011. Atli Gregersen er eisini nevndarlimur í Havbúnaðarfelagnum.



**Jóhanna á Bergi, nevndarlimur**

Jóhanna á Bergi er stjóri á flutningsfyritøkuni Faroe Ship. Harumframt er Jóhanna á Bergi nevndarlimur í fleiri føroyskum fyritøkum. Jóhanna á Bergi hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2008.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY